| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>24. juni 2010 | Blað nr.:<br>**8503** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 24. juni 2010 kl. 22.30**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 87/10-120/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Levi Mørk
Gunnar Mohr
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen
Jan Christiansen

**LUTTÓKU IKKI:**
**Vagnur Johannesen** hevur boðað frá, at honum berst frá at luttaka á býráðsfundinum. Fráboðanin er tikin til eftirtektar.

**LUTTÓKU EISINI:**
Janus Isfeldt
Bjørgfríð Ludvig
Jóan Petur Hentze
Óla Jákup Rólantson

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**90/10** **2009-1366**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Gunnar Mohr, eru loknar.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt.

**91/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið til eftirtektar.

**92/10** **2009-1489**

**Ellis- og røktarheim yviri við Strond**

Føroya Løgting hevur 30. apríl 2009 samtykt nýggja lóg um studningslán til bygging av ellis- og røktarheimum. Nú kunnu kommunurnar fáa upp til 50% av byggikostnaðinum, tó í mesta lagi 700.000 kr. pr. búfólk. Løgtingslógin áleggur Almannaráðnum at viðgera umsóknirnar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum.

Tørvurin á røktarheimsplássum í Suðurstreymi fer sambært hagtalsmetingum hjá Hagstovuni helst at økjast í framtíðini. Sum er, eru 145 persónar visiteraðir til eldrabústovn. Av teimum hava um leið 75 ein bráðneyðugan tørv.

Í sambandi við at lógin um studningslán er lýst og sett í gildi hevur Almannamálaráðið við skrivi til Kommunusamskipan Føroya, dagfest 28. mai 2009 heitt á kommununar um innan 1. juli 2009 at koma við umsóknum um stuðul. Umsóknirnar verða viðgjørdar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum og við fakligari ráðgeving frá ávikavist Nærverk og Landsverk.

Fyri at taka eitt munagott stig, sum eisini tryggjar framtíðar tørv, meta samgonguflokkarnir, at kommunan eigur at byggja røktarheim í Tórshavn við 64 búplássum yvir tvey ár treytað av, at landsstýrið veitir stuðul til helvtina av byggikostnaðinum umframt at tryggja raksturin.

**Sosiala nevnd 9. juni 2009:** Ásannandi stóra tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í Suðurstreymi samtykkir sosiala nevnd at mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndini til, at søkja landsstýrið um studningslán til at byggja røktarheim við 64 búplássum á økið, kommunan hevur ognað sær til endamálið Yviri við Strond.

Samstundis verður heitt á umsitingina um at gera byggiskrá til røktarheim við 64 búplássum Yviri við Strond, og at játta 200.000 kr. til endamálið av íløgum á trivnaðarøkinum ætlað eldraøkinum í 2009.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 25. juni 2009:** Eimælt samtykt.

**Nýtt:**
Við skrivi, dagfest 13. oktober 2009, hevur Almannamálaráðið boðað frá, at landsstýriskvinnan í almannamálum hevur gjørt av at geva kommununi tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 44,8 mió. kr. til 64 búpláss.

**Sosiala nevndin 20. oktober 2009:** Nevndin varð kunnað um málið og at Albert Isfelt og Gudmund Hansen, arkitektar, hava fingið arbeiðið at gera byggiskrá

**Ískoyti:**
Ì samband við útbjóðing av arbeiðinum at projektera og byggja nýtt røktarheim Yviri við Strond, skal støða takast til útbjóðingarhátt. Málið er viðgjørt í arbeiðsbólkinum, sum borgarstjórin hevur sett at fyriskipað ger av byggiskránni. Vísandi til stuðulstilsøgnina frá landsstýrinum, svarandi til kr. 700.000 pr. búpláss, metir arbeiðsbólkurin at miðjast skal eftir at byggja røktarheimið fyri ein prís so tætt uppá 1,4 mió. pr. búpláss, sum til ber. Arbeiðsbólkurin metir, at størstu sannlíkindini eru fyri at røkka hesum, við at bjóða arbeiðið út í umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka. Hesin útbjóðingarháttur krevur, at avgerð

verður tikin um samsýning til tilboðsgevarar, hvør mannar dómsnevndina, og hvørji viðurskifti verða løgd til grund fyri avgerð um hvat tilboð kommunan velur.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin mælir í hesum sambandi til fylgjandi:

1. At upp til 5 tilboðsgevarar verða útvaldur við eini pre-kvalifikatión har ásett verða krøv til tekniskan og fíggjarligan førleika, royndir, góðskutryggingarskipanir o.l. krøv, sum umsitingin lýsir.
2. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari, umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka, millum teir útvaldu tilboðsgevararnar, ið eru prekvalifiseraðir.
3. At samsýningin til tilboðsgevararnar verður upp til 150.000 pr. uppskot og annars sambært ásetingunum í ABT93, men tó soleiðis, at endaliga samsýningin verður útroknað eftir í hvønn mun innlatin tilboð lúka krøvini í byggiskránni.
4. At dómsnevndin verður mannað við bygginevndini og býararkitektinum. Harumframt kunnu limirnir í arbeiðsbólkinum og onnur fakfólk virkað sum ráðgevarar hjá dómsnevndini.
5. At tilboðini verða mett út frá hesum fortreytum:

| **Evni** | **Vekt í %** | **Stigatalva 1 - 9** | **Stig tilsamans** | **Vektaði prosentstig** |
|---|---|---|---|---|
| Arkitekturur | 20% | | | |
| Funktionalitetur | 20% | | | |
| Tilfar/góðska | 15% | | | |
| Tilboðsupphædd | 20% | | | |
| Samsvar við byggi-skránna (v. fleiri undirpunktum) | 25% | | | |
| | 100% | | | |

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur móttikið byggiskránna og tekur fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Til verkætlanina eru játtaðar kr. 200.000,- til ger av byggiskrá. Eftir á íløguætlanini á eldraøkinum fyri 2009 eru kr. 1.390.700,-

Við fyrivarni fyri møguligum smærri tillagingum mælir arbeiðsbólkurin til at góðkenna byggiskránna, og at fyribils verða játtaðar kr. 1.390.000,- til

verkætlanina til m.a. at fíggja jørðkanningar, samsýning til tilboðsgevarar og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Við fyrivarni fyri møguligum smærri tillagingum í byggiskránni mæla kommunustjórin og sosialdeildarleiðarin til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, og at játtaðar verða kr. 1.390.700 av íløgum á eldraøkinum fyri 2009.

**Sosiala nevnd 16. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Lýst er eftir heildararbeiðstakarum til undangóðkenning (prekvalifikatión), og tá freistin var úti høvdu 9 heildararbeiðstakarar og samtøk latið inn umbøn um undangóðkenning.

Hesir vóru:

1. Samtakið ÞG Verktakar ehf, Sp/f TG Verk og P/F Valbjørn Dalsgarð
2. Sp/f Búsetur
3. P/F M T Højgaard Føroyar, Tórshavn
4. Samtakið P/F H. V. Lützen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f ÁTS
5. Sp/f Bulur
6. P/F J & K Petersen
7. P/F Articon
8. Byggisamtakið 2K v. Sp/f Norðhús og Sp/f ÁTS
9. P/F Pihl Føroyar

Umsitingin hevur gjøgnumgingið innlatna tilfarið, og hevur kannað eftir, í hvønn mun umbidnu upplýsingarnir eru innlatnir og/ella spurningarnir eru svaraðir. Við støði í innlatna tilfarinum, er gjørd ein heildarmeting av arbeiðstakarunum/samtøkunum.

Havandi í huga, at býráðið hevur avgjørt at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøka (totalentreprisa) í umvendari lisitatión, eru royndirnar hjá heildararbeiðstakarum við hesum útbjóðingarhátti týdningarmiklar fyri úrslitið. Heildararbeiðstakarin skal sjálvur megna at leiða og skipað prosjekterings- og eftirlitsarbeiði innanfyri teir karmar sum eru ásettir í byggiskránni v.m. og sáttmálanum við byggiharran. Hetta krevur, at heildararbeiðstakarin hevur eina hóskiliga umsiting at røkja hesar uppgávur.

**Tilmæli**
Við støði í krøvunum um upplýsingar og tilfar í lýsingini um undan-góðkenning, innlatna tilfarinum og eini meting av hvørjum einkultum heildararbeiðstakara/samtakið, hevur bygginevndin á fundi hin 27. januar 2010 samtykt at mæla sosialu nevnd til, at innstilla hesi 5 virki/samtøk til undangóðkenning í nevndu raðfylgju:

1. P/F Articon
2. P/F M T Højgaard Føroyar, Tórshavn
3. P/F J & K Petersen
4. Samtakið ÞG Verktakar ehf, Sp/f TG Verk og P/F Valbjørn Dalsgarð
5. P/F Pihl Føroyar

Fyri øll 5 frammanfyri nevndu virkini er galdandi, at mælt verður til ávísar treytir fyri hvørt einkult virkið sær.

**Sosiala nevnd 28. januar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2010:** Fíggjarnevndin samtykti at mæla býráðnum til at innstilla nr. 1-3 til undangóðkenning í hesi raðfylgju:

1. P/F Articon
2. P/F M T Højgaard Føroyar
3. P/F J & K Petersen

**Býráðið 28. januar 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Dómsnevndin hevur latið bygginevndini úrslitið av tilboðsdømingini. Dømingin er gjørd eftir vegleiðingini og býráðssamtyktini, har ásett er, hvussu tilboðini skulu dømast, herundir eisini hvussu einstøku høvuðspunktini eru vektað.

Úrslitið er hetta:

| | |
|---|---|
| Articon | 3,97 |
| J&K Petersen | 3,76 |
| MT Højgaard I | 3,35 |
| MT Højgaard II | 3,39 |

Staðfestast kann, at Articon hevur fingið flest stig. Staðfestast kann eisini, at av 9 møguligum stigum, liggja øll uppskotini undir miðal.

Í byggiskránni, sum er arbeiðsgrundarlagið, verður skrivað, at viðvíkjandi funktiónskrøvum og góðskustøðinum, kann byggingin samanberast við “Mørkina” í Streymnesi. Tó skal bygningurin sum heild vera í minsta lagi sambært góðskuflokki B í BR-08. Harumframt er “Uppskot til kunngerð um røktarheim”,

dagfest 8. juni 2009, brúkt sum grundarlag fyri stødd á bygningi og rúmum bæði til búfólk, starvsfólk og felagsfunktiónir v.m.

Bygginevndin staðfestir, at einki uppskot livur fult upp til byggiskránna. Uppskotini hava eisini trupulleikar í mun til myndugleikagóðkenningar.

Býráðið hevur samtykt ein targetprís uppá kr. 64 mió, men við einum spenni á +/- kr. 7,5 mió. Øll góðkendu tilboðini liggja upp í móti ovara kostnaðarmarkinum, men megna hóast hetta ikki at koma upp á miðal í dømingini. Hetta bendir á, at kostnaðarjáttanin er ov lágt sett.

**Tilmæli:**
Bygginevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin mælir frá at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum, tí øll teirra hava grundleggjandi manglar í mun til byggiskránna og myndugleikakrøv, sum ger, at tað er ikki ráðiligt at realisera nakað av uppskotunum á fyriliggjandi grundarlagi.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at fara í sáttmálasamráðingar við Articon, ið hevur fingið flest stig.

**Sosiala nevnd 15. juni 2010:** Málið útsett.

**Ískoyti**
Vísandi til tilmælið hjá bygginevndini til fundin í sosialu nevnd 15. juni 2010, er málið viðgjørt innanhýsis av trivnaðarfyrisitingini, teknisku fyrisitingini og løgdeildini við tí fyri eyga at umrøða møguleikar fyri, hvussu komast kann víðari við at fáa eina nøktandi loysn. Í samráð við borgarstjóran og kommunustjóran hevur umsitingin eisini havt felags fund við umboð fyri allar tríggjar tilboðsgevararnar og fyri Vinnuhúsið hin 21.06.10, at umrøða møguleikar fyri loysnum, og hvørja støðu hesir høvdu til tað. Hesi umboð hava hin 22.06.10 svara hvørja støðu teir hava.

**Tilmæli:**
Við støði í tilmælinum hjá meirilutanum í bygginevndini hin 15. juni 2010, og í svarskrivi frá tilboðsgevarunum/Vinnuhúsinum hin 22. juni 2010, mælir bygginevndin til fylgjandi:

1. **at** annulera lisitatiónina fyri innlatnu tilboðini/uppskotini,
2. **at** tann í útbjóðingartreytunum ásetta samsýningin sambært ABT93, §2, stk. 6, á max kr. 150.000, verður goldin øllum trimum tilboðsgevarunum, hetta grundað á, at tað gera seg galdandi serligar umstøðurnar í málinum, men at hetta er uttan prejudicerandi virkna,
3. **at** arbeiðið verður boðið út av nýggjum til teir tríggjar somu undangóðkendu tilboðsgevararnar við innlatingarfreist hin 1. sept. 2010, kl. 14.00,
4. **at** samsýningin sambært ABT93, §2, stk. 6, í sambandi við nýggju útbjóðingina verður kr. 100.000, men at um eitt uppskot verður tilnevnt sum

vinnari av lisitatiónini í hesum seinna umfarinum, verður fulla samsýning teirra – tvs. eisini tað, teir hava fingið fyri fyrsta uppskotið sambært omanfyristandandi pkt. 2, frádrigið í sáttmálaupphæddini,

5. **at** samsýningin sambært omanfyristandandi pkt. 4 harumframt er treytað av, at hvørt uppskoti sær fær eitt samlað stigatal á minst 6,0 í miðal fyri tey 3 dømingarkriteriini undir niðanfyristandandi pkt. 7,
6. **at** fíggjarliga loftið í hesum sambandi verður strikað, men at tilboðsupphæddin hinvegin verður vektað hægri,
7. **at** dømingarkriteriini annars verða broytt til fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Arkitekturur og funktionalitetur | 35% |
| Tilfar og góðska | 25% |
| Tilboðsupphædd | 40% |

8. **at** krøvini í byggiskránni verða ófrávikilig minstukrøv,
9. **at** rúmstøddin á búrúmum skal ikki verða minni enn 34 m² brutto,
10. **at** fráboða tilboðsgevarunum, at ongi fyrivarni verða góðkend, heldur ikki viðvíkjandi myndugleikakrøvum o.l., og at tilboð við fyrivarnum verða at meta sum ikki-konditiónsmessig, og sostatt heldur ikki fáa samsýning sambært omanfyristandandi pkt. 4,
11. **at** umsitingin fær heimild at gera rættingarskriv til partar av byggiskránni, herundir hvussu brutto-/netto fermetrar skulu roknast og upplýsast, hvussu brunaloysnir skulu lýsast í tilboðunum/uppskotunum, hvussu útiøkir o.l. skulu lýsast, og aðrar viðkomandi rættingar, sum dómsnevndin við støði í fyrru dømingini hevur mett kundu verið meira nágreiniligar.
12. **at** byggiharrin tilskilar sær rætt onki uppskot at velja, og
13. **at** dómsnevnd og bygginevnd verða óbroyttar.

**Sosiala nevnd 23.juni 2010:** Ein meiriluti: Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk og Bogi Andreasen mælir býráðnum um fíggjarnevndina at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge, samtykkja at mæla býráðnum til at taka undir við samtyktini hjá sosialu nevnd tann 23. juni 2010 við teirri broyting, at pkt. 5 í omanfyristandandi tilmæli frá bygginevndini verður soljóðandi:

*”At samsýningin sambært omanfyristandandi pkt. 4 harumframt er treytað av, at somu uppskot sum áður eru latin inn, kunnu ikki latast inn aftur í óbroyttum líki, og at tað skal týðiliga framganga av prosjekttilfarinum, ið verður latið inn, at góðskustøðið á uppskotunum viðv. Dømingarkritieriunum ”Arkitekturur og funktionalitetur” og ”Tilfar og góðska” sambært niðanfyristandandi pkt. 7, eru betraði.”*

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen og Annfinn Brekkstein

Greiddu ikki atkvøðu: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**93/10** **2010-1230**

**Uppskot til regulering av byggisamtyktini fyri Nólsoy.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við umsókn um sundurbýti og marknaumskipanir við fótbóltsvøllin í Nólsoy, hevur Umhvørvisstovan víst á nakrar trupulleikar.

Fótbóltsvøllurin er ætlaður at liggja í E-økinum – alment frítíðarøki, men partar av vøllinum liggja í B-økinum – vinnuendamál og H-økinum – landbúnaður.

Ætlanin er tí at regulera økisskipanina soleiðis, at ein lítil partur av B-økinum við Matvørubúðina, matr. nr. 167 og ein partur av fjøruni verður broytt til E-øki.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Nólsoy verður broytt samsvarandi hjáløgdu kortskjølum dagf. 18. mai 2010.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**94/10** **2002-2016 HH**

**Umsókn um at avlýsa servitutt á matr. 440 á Gripsvegnum Tórshavn.**

Umhvørvisstovan biður um, at ein servittuttur verður avlýstur sum ein vegrættur á matr. 440 Tórshavn, í sambandi við eina marknaumskipan av matr. 440 og matr. 438 á Gripsvegnum, Tórshavn, talan er um eitt parkeringspláss.

Matr. 456e hevur havt vegrætt gjøgnum matr. 440, sum nú skal avlýsast í sambandi við broyting av matriklinum .

Servitutturin skal verða liggjandi á matr. 438, sum hann er lýstur á at verða vegrættur til 456e.

Atkomurættur gjøgnum matr. 440 verður strikaður - eigari av matr. 440 er Tórshavnar kommuna og kommunan hevur átalurætt.

Víst verður til jounal nummar 2002-2016/48.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at servitturin um atkomurætt frá matr. 440 verður avlýstur og strikaður, vegrætturin frá matr. 438 til matr. 456e verður liggjandi, sum hann er lýstur, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við teknisku nevnd 29. apríl 2010.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**95/10** **2009-3106**

**Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

- Nú fór Maria Hammer Olsen

**96/10** **2005-1577**

**Uppskot til navn til nýggjan veg/útstykking undir Gráasteini**

Í sambandi við nýggja útstykking á matr. nr. 1115a undir Gráasteini hevur lendisdeildin heitt á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til navn til ein nýggjan veg í sambandi við útstykkingina. Hildið verður, at tað er óheppið, um hesin vegur eisini fær adressuna *undir Gráasteini*, tí tann vegurin er langur og talmerkingin ógreið í støðum.

**Gøtunavnanevndin 22. apríl 2010**: Mælt verður til at nevna vegin "Meinarstrøð"eftir fyrrverandi eigaranum, sum eisini hevur dyrkað trøðna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Maria Hammer Olsen,

**97/10** **2010-0891 KF**

**Uppskot til broyting av ásetingum fyri umráðispartarnar D í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin er, saman við einum stýrisbólki (mannaður við politikkarum frá teknisku-, umhvørvis- og byggi- og býarskipanarnevndini og tekniska stjóranum, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum) í gongd við at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina.

Í sambandi við fyrireikingar til bygging av skúladepli á D2-økinum á Marknagili, metir umsitingin tað verða rætt at gera ætlaðu broytingarnar í ásetingunum fyri umráðispartarnar D í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu longu nú.

Broytingarnar í hesum partinum av byggisamtyktini eru avmarkaðar til at seta eina nýggja grein 2 inn sum ásetur at byggjast kann loyvast í D1-økinum sambært serstakari byggisamtykt, strika mest loyvda nettonýtslustig og krav til serstaka byggisamtykt í sambandi við bygging í D2 og D3 í staðin fyri at útstykking skal hóska til býarskipan fyri náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum. (Fyrsta broytingin, um serstaka byggisamtykt fyri D1-økið, er longu samtykt í sambandi við nýggja kirkju á Argjum – mál nr. 2006-0769. Seinasta freist at koma við mótmælum er 10. mai 2010).

Verandi:

***§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar  D  í  3. Grundumráði***

1. *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.*

2. *Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

3. *Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.*

4. *Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.*

5. *Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.*

Broytt:

***§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði***

1 *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til frílendi, almenning, náttúrufriðingarendamál og tílíkt..*

2 *Bygging í D1 kann loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvari við stk.1.*

3 *Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

4 *Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.*

5 *Byggistigið má, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara uppum 0,25.*

6 *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt..*

Hesar broytingarnar hava við sær:

- at loyvt verður at byggja í D1-øki, um ein serstøk byggisamtykt, sum loyvir hesum, verður gjørd. Tvs. at kommunan hevur møguleika til at stýra nýtsluni á D1-økunum. Tað, at neyðugt er við eini serstakari byggisamtykt, merkir, at tá støða verður tikin til at byggja nakað á D1-øki, verður hetta viðgjørt nágreiniliga av umsitingini, byggi- og býarskipanarnevndini og býráðnum og skal eisini góðkennast av landsmyndugleikum.

- í D2- og D3-økjunum er í dag loyvt at útstykkja og byggja *"um tað hóskar til býarskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartin"*. D3-økini eru økir til stórar almennar stovnar t.d. Landssjúkrahúsið, Debusartrøð, Marknagil v.m. og D2-økini eru ítróttarøkir t.d. Gundadalur, golfvøllurin á Glyvursnesi, rossaøkið í Havnadali v.m. Eftir broytingina skal ein serstøk byggisamtykt til fyri at loyva útstykking og bygging her.

- Nettonytslustigið upp á 0,3 verður tikið burtur fyri D2 og D3. Hetta tí, at ein serstøk byggisamtykt kann stýra hesum neyvt og at man í ein ávísan mun ynskir, at teir stóru almennu stovnarnir, t.d. Landssjúkrahús, Skúladepil v.m., skulu byggjast í hæddum í staðin fyri eftir lendinum.

- Ì stuttum eru broytingarnar:

    - loyvt er at byggja í D1-økinum sambært serstakari byggisamtykt
    - útstykkingar og bygging í D2- og D3-økinum skulu skipast eftir serstakari byggisamtykt
    - Nettonýtslustigið upp á 0,3 er tikið burturúr

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ásetingarnar fyri umráðispartar D í almennu byggisamtyktini verða broyttar til:

**<u>§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði</u>**

1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til frílendi, almenning, náttúrufriðingarendamál og tílíkt..

2 Bygging í D1 kann loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvari við stk.1.

3 Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

4 Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

5 Byggistigið má, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara uppum 0,25.

6 Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt..

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at fara út á ástaðarfund í D1, D2 og D3 økjum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin var á ástaðarfundi. Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jan Christiansen og Levi Mørk samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jógvan Arge tekur støðu á einum seinri fundi.

**Býráðið 24. juni 2010:** Málið beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**98/10** **2010-0426 KF**

**Serstøk byggisamtykt fyri økið til kirkju á Argjum**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í februar 2006 kom fyrispurningur frá kirkjuráðnum á Argjum um at finna eitt øki til at byggja nýggja kirkju á Argjum. (mál nr. 2006-0769).

Umsitingin gjørdi eitt uppskot um staðseting av kirkjuni millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sum var samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini.

Av tí at økið liggur tætt við Sandá, var søkt um undantaksloyvi frá friðingarmyndugleikunum til at byggja her.

Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 $m^2$ av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at øki liggur í D1-øki (*almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt*), ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at frábýta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum, sum staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum við grundarlagi í teimum tekningunum, sum vóru gjørdar í sambandi við uppskotinum til staðseting av kirkjuni. (mál nr. 2006-0769).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum verður góðkent.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla serstøku byggisamtyktini fyri økið til nýggja kirkju á Argjum var 3. mai 2010.

Kommunan hevur móttikið 2 mótmæli. Tann eina við 241 undirskriftum og hin við 4 undirskriftum.

Í báðum kærunum verður mótmælt at kirkja verður bygd økinum, sum ætlað er til kirkju á Argjum.

Víst verður á, at økið er sera náttúruvakurt og nógv fólk spáka eftir gøtunum, sum eru gjørdar her og at økið eiður at varðveitast sum eitt petti av nærum óspiltari náttúru mitt í býnum.

Eisini verður víst á, at sambært útstykkingarætlanini Müllerstrøð skuldi økið millum Sandá og Støðlagøtu, skuldi verða fríøki.

<u>Til hetta er at siga:</u>

Í uppskotinum til serstaka byggisamtykt er lagt upp til, at gøturnar í minst møguligan mun verða ávirkaðar av byggingini og har tær verða ávirkaðar skulu nýggjar gøtur leggjast, soleiðis at møguleikarnir at ganga túr her ikki verða stórvegis ávirkaðir.

Sambært serstøku byggisamtyktini skal byggingin eisini haldast so langt frá Sandá, at áin sjálv ikki skal verða ávirkað.

Framvið niðasta partinum av Sandá er longu bygt sera tætt ánni, men gøtusamband ger tað møguligt at ganga framvið ánni frá Sandagerði og niðan ímóti Havnardali.

Eisini kann vísast á, at tá tað er eina kirkju økið verður lagt út til, verða serlig krøv sett til bygningin og hvussu uttanumøkið verður handfarið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at halda fast um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum vísandi til omanfyrinevnda.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at fara á ástaðarfund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin var á ástaðarfundi. Ein meiriluti Boði Andreasen, Jan Christiansen og Levi Mørk samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jógvan Arge tekur støðu á einum seinri fundi.

**Býráðið 24. juni 2010:** Málið beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**99/10** **2007-1719 KF**

**Serstøk byggisamtykt fyri "Útstykking 200" eystan fyri Karlamagnusar-breyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
"Útstykking 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella

av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grunddøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthús-ini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri ”Útstykkingina 200”, eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú avgerð er tikin um at fara í gongd við útstykkingina við Mylnutjørn, hevur umsitingin gjørt uppskot til at tillaga ætlanina soleiðis, at tað slepst undan at byggja brandmúrar ímóti grannamarki. Eisini er uppskot gjørt til at geva loyvi til at byggja karnappar, svalar o.a. eftir at fyrispurningar um hettar eru komin frá teimum sum hava fingið tillutað stykkir.

Tí hevur umsitingin gjørt uppskot um broytingar í serstøku byggisamtyktini hesum viðvíkjandi.

Tær flestu broytingarnar eru í § 4 um bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

Serstaka byggisamtyktin verður løgd fram á fundinum og uppskot til broytingarnar verða gjøgnumgingnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri ”Útstykking við Mylnutjørn”, j.nr. 2007-1719/12,

verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt við tí ískoyti, at heiti skal broytast til "Útstykking við Myllutjørn".

**-Ískoyti:**
Seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 19. apríl 2010.

Kommunan hevur móttikið tvey mótmæli/broytingaruppskot.

Tað eina mótmælið er felags frá 14 av keyparunum og snýr seg um avmarkingarnar av vindeygum ímóti marki.

Hitt mótmælið/broytingaruppskotið snýr seg um møguleika at samanbyggja sethús og bilhús og at nýta bilhústakið til altan.

Ummæli av mótmæli/broytingaruppskotum og tilmæli koma til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at at beina málið í bygginevndina til ummælis áðrenn støða verður tikin.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá bygginevndini dagfest. 18 mai 2010, j.nr. 2007-1719/23. Skrivið verður framlagt á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri "Útstykking við Mylnutjørn", j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við viðmerkingunum frá bygginevndini í skjali nr. 2007-1719/23 og heitir á umsitingina at kanna eftir um hesar kunnu arbeiðast inn í serstøku byggisamtyktina.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur við tilfari til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til serstaka byggisamtykt við hesum broytingum:

*§4, stk. 6.2.: Húsaendi móti koyrivegi kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,9 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

*Nýtt §4, stk. 6.3: Húsaendi móti fríøki og gøtu, felagsøkini undantikin, kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,6 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt, at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 14. juni 2010, við tí ískoti til §4 stk. 1.5, at ásetingin ikki er galdandi fyri hús 8, 23, 38 og 54.

**100/10** **2005-1183**

**Viðv. matr. nr. 297 - Reinsaríið.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt innleiðandi kanningar av bygninginum á matr. nr. 297.

Endamálið við kanningararbeiðinum hevur verið at gera eina støðismeting av bygninginum, ið skal liggja til grund fyri seinri støðutakan til bæði endamálsorðing og arbeiðsgongd fyri eitt hvørt arbeiði við ognina.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina havt í umbúna at væla um omanfyri nevndu ogn. Ognin er áhugaverd. Her er eitt gamalt pakkhús í søguligu Havnini, og hevur Býarsavnið gjørt viðmerkingar til ætlanina at varðveita bygningin.

**Húsasøga**
Við avtøku kongliga handilsins varð m.a. sonevnda "Nýggja Pakkhús" í Vágsbotni (Frederiksvaag) selt á uppboði í 1857.[1] Keyparin var handilshúsið C. F. Siemsen í Hamburg. Skeytið varð lisið sama ár.

Í 1894 seldi keypmaðurin Johannes Hansen, týskur varakonsul, pakkhúsið fyri Siemsen til føroyska handilshúsið M. C. Restorff & Sønner. Konsul Hansen, sum hann kallaðist, var í starvi hjá Siemsen, og seinni keypti hann sjálvur fyritøkuna. Hann myndaði Siemsen í Havn, og harav stavar navnið Hansens pakkhús.

M.C. Restorff & Sønner keypti sum sagt ognina í Vágsbotni. Í skeytinum stendur skrivað ymiskt:

*"...en Pakhusbygning, 2 Etager Høj, ca. 30 Alen lang og 16 Alen bred med den tilsammen hørende Tømmerplads, der med den Grund, hvorpaa Pakhuset staar, udgjør en Firkant [...] og hvoraf en østre Del er særskilt indhegnet og Dyrket som*

[1] Yvirlit yvir sølu av ognum einahandilsins, sí Mikkjal Helmsdal: ...verjir fyri Havnarvág (Tórshavn 1994), s. 56-60.

*Have...”* [2] Konsul Hansen tryggjaði sær ræ ttin til urtagarðin eystan fyri Tórsgøtu, nevnt “Hansens Have” - t.e. í dag parkeringsplássið niðan móti Kommunuskúlagarðin og ‘Fish & Chips’.

Í 1923 seldi M.C. Restorff & Sønner ognina til Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik, Meiaríið. Keypssáttmálin nevnir ognina “Hansens pakkhús”.[3] Tey høvdu eitt nú framleiðslu av sápu í pakkhúsinum.[4] Meiaríið helt fram í bygninginum og hevur havt vaskarí og reinsarí fram til 1970-árini. Maria Olsen hevði Reinsaríið í erva til fyri fáum árum síðani, meðan Postverk Føroya hevði eina pakkadeild í neðra.

Tórshavnar kommuna hevur átt bygningin síðani 1986.

**Kanningar av ognini**
Føroya Fornminnissavn hevur áður víst ognini áhuga. Í 1981 gjørdi táverandi savnsarkitekturin Rúni H. Øster eina skitsuuppmáting. Annað er ikki at finna í málinum.

Søgufrøðingurin Ásla Weihe hevur í ritgerð um handilin hjá Ryberg í seinnu helvt 18. aldar við rúgvismiklum skjølum roynt at endurskapa upprunaliga umhvørvið í Vágsbotni. Víst verður til verk Carl Mogensens: Færøske Krønike (1844, seinni útgivið í Tórshavn 1970), at uml. 1820 skal kongligi handilin hava keypt gomlu ognirnar hjá Ryberg *“...hvis Pakhus af 130 alens Længde, var solid bygget af svær pommersk Tømmer, og hvor Handelen, saalænge det stod, stedse havde 1500 à 2000 Tdr. Korn paa Oplag...”*. Víðari vísir Ásla Weihe á eina húsaskrá í 1784, at pakkhúsið var 100 x 15 alin, meðan ein húsaskrá í 1819 sigur, at tá stóð pakkhúsið ikki uppi.

Við støði í 1784-skrásetingini lýsir Ásla Weihe í einum uppskoti, at Vaskaríið, sum vit kenna tað í dag, kann hava verið partur av einum longum pakkhúsi - 100 x 16 alin. T.v.s. at handilin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni (Sosialurin) og norður um verandi Vaskarí hevur verið ein bygningur. Hetta verður undirbygt við skjali hjá amtinum, sum sigur: *“...det for störste Delen kommer til at hvile på Fundamentet af det der forhenstående Pakhus…”* [5]

Kanningin hjá Áslu Weihe av umhvørvinum er virðismikil. Við skjølum hevur hon greinað søguliga Vágsbotnshandilin aftur til 1766.
Tað er sjáldsamt við eini húsaogn uppi í tí nýggjara býnum, har søguligu sporini ganga meira enn tvær øldir aftur til tað gamla samfelagið. Hóast pakkhúsið sambært greining Áslu Weihe av Rybergstíðini varð endurreist í 1831, so er slóðin av virknu tíðini hjá Ryberg, frá tí fyrsta átakinum at hava skipaða framleiðslu av fremmandum vørum í Føroyum, kortini sjónlig.

---

[2] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1894-1895, nr. 29, s. 90.
[3] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1922-1923, nr. 47, s. 755-756.
[4] Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik 1908-1958 (Tórshavn 1958), s. 20.
[5] Ásla Weihe: Rybergshandilin og Rybergstíðin í Føroyum (Varðin 58, Tórshavn 1991), s. 26-27.

Pakkhúsið er harnæst ein vitnisburður um virksemið hjá kongliga handlinum og hjá eitt av fyrstu útlendsku handilshúsunum í fríhandilstíðini, Siemsen, og síðani hjá eitt av fyrstu stóru føroysku handilshúsunum, Restorff - tá ið Føroyar gjørdust fiskivinnutjóð. Bygningurin hevur v.ø.o. staðið uppi og verið í brúki í fleiri søgulig skeið.

Eru vit lagalig, so siga vit, at aldurin á pakkhúsinum skjótt er 175 ár. Forsøgulig viðurskifti kunnu vit ikki rættiliga fáa skjalfest, men lítið er at ivast í, at pakkhúsið hevur verið partur av handilsumhvørvinum við Vestaruvág seinast í 1700-talinum.

Á Fornminnissavninum eru fotomyndir av pakkhúsinum við flagtekju og tjøraðum klædningi og myndir av bygninginum á leið soleiðis, sum hann sær út í dag. Hesar eru úr savninum hjá myndatakaranum Absalon Joensen og kunnu helst tíðarfestast til 1920-30-árini og fyri vist frá krígnum 1940-1945.

Býarskipanardeildin hevur gjørt fullfíggjaðar uppmátingar av bygninginum og hevur gjørt frágreiðing um støðismeting, kostnaðarætlan og arbeiðsgongd framm yvir.

Arbeiðið verður mett at skula gerast í stigum.

Skotið verður upp at fara undir at taka verandi klæðing frá fyri at sleppa at umvæla og skifta berandi konstruktiónir, haraftrat skal farast undir at klæða og skifta vindeygu og hurðar, sum hoyrandi til 1. byggistig.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin góðkennir ætlanina, og at nevndin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at játta kr. 900.000, til hetta arbeiðið, av íløgunum fyri 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. mai 2005:** Einmælt samtykt.

**Lýsing:**
Tilboð eru komin inn, dagfest 10. nov. 2006, til klæðing (mál nr.2006-3262/2), skifta vindeygu og hurðar, grevstrararbeiði rundan um Pakkhúsið og ymisk neyðug HVS-arbeiði.

Lægsta tilboð hevði Húsavarðartænastan áljóðandi

| | | |
|---|---|---|
| | kr. 2.096.370,00 | +MVG |
| Projektering og eftirlit verður mett til | kr. 300.000,00 | + MVG |

| | | |
|---|---|---|
| Óvæntað verður mett til 15% | kr. 360.000,00 | + MVG |
| Tilsamans mettur kostnaður uttan MVG | kr. 2.760.000,00 | |
| Tilsamans mettur kostnaður við 6,25%MVG | kr .2.932.500,00 | |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin og tekniski stjórin mæla til, at peningurin kr. 2.932.500,00 til hetta arbeiðið verður fíggjaður við 2 mill. kr. av konto 82, sum so skal tillagast, og við 500.000 kr av íløgum fyri fríðkan av býnum, vísandi til at partur av arbeiðinum er í lendinum kring bygningin. Endaliga varð avsettur peningur í 2006, og eru uml. 500.000 kr eftir av hesum at brúka.

Sostatt verður mælt til at mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum, og fíggja tað eftir ávísta leistinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 500.000,00 av íløgum.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Í álitinum Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi – verður skotið upp at gera Tórsgøtu til mentanargøtu í Havn, her eru savnað ymisk mentanartiltøk á einum rímiliga lítlum øki, miðskeiðis í býnum. Í dag er fittur partur av hugskotum at gera Tórsgøtu til mentanargøtu vorðin veruleiki. Niðasti partur av Tórsgøtu er vorðin ein rættur mentanardepil, har vit hava:

Tjóðpall Føroya, Margarinfabrikkina, venjingarhølið hjá Tórshavnar Hornorkestri, Posthúskjallaran. Eisini er samtykt at seta Hansens Pakkhús – betri kent sum Gamla vaskaríið – í stand at nýta til mentanarlig tiltøk.

Fleiri ymisk tiltøk eru staðsett í Tórsgøtu. Eitt tað størsta man vera Asfalt, sum eftir væleydnaða tiltakið í fjør ætlandi veðrur árliga afturvendandi.

Í vár verður fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair hildin í Havn, og partur av teimum tiltøkum, sum tá verða hildin, verða hildin júst í hesum umhvørvinum.

Nú býráðið hevur samtykt at umvæla ognina verður neyðugt at taka støðu til hvat húsini skulu brúkast til í framtíðini.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at kanna møguleikarnar at brúka húsini til spælistað hjá tónleikarum og ungdómslistaskúla, og at leggja málið fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Mentamálanevndin 15. mai 2007:** Nevndin var á staðnum og hugdi eftir húsunum og grannalagnum.

Samtykt at heita á umsitingina um at gera uppskot til heildarætlan fyri reinsaríið, túnið og bygningarnir rundanum.

**Uppískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Ískoyti:**
Avgjørt at geva fyribils loyvi fram til ólavsøku 2008 at royna niðastu hædd á Hansen´s Pakkhús til tónleikaframførslu. Hetta er góðkent av Brunaumsjón Landsins, sløkkiliðsovastanum hjá Tórshavnar kommunu og tekniska stjóranum. Nakað av trygdarútgerð skal uppsetast og ljós og el-veiting má leggjast inn til bygningin. Hetta er mett at kostað uml. kr. 100.000.

Fyri at koma víðari við fyrireikingunum at gera Hansen´s Pakkhús klárt til varandi nýtslu til almenn endamál, er neyðugt at gera eitt prosjekt um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. í bygningin. Mett er at neyðugt er við uml. kr. 300.000 til at gera skitsuppskot.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti mæla kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2008 til mentunnarlig endamál, sum eru settar av til Sankta Frans skúla, lutað sundur til á henda hátt:

- at seta upp trygdarútgerð og gera fyribils el-innleggingar v.m. í royndartíðini fram til ólavssøku 2008 – kr. 100.000
- at gera skitsuuppskot til innrætting og nýtslu – kr. 300.000

og at seta samsvarandi upphædd av til Sankta Frans skúla í 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum, tó so at skitsuuppskotið til innrætting og nýtslu eisini umfatar túnið og bygningarnar rundanum í samráð við trivnaðarumsitingina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ìskoyti**

Sambært samtykt mentamálanevndsins 17. juni, fíggjarnevndsins 18. juni og býráðsins 19. juni 2008 hevur niðasta hæddin í Gamla reinsaríi verið roynd til tónleikaframfrøslu fram til ólavsøku 2008.

Margarinfabrikkin hevur samskipað tiltøkini, sum hava verið. Afturljóð frá tónleikarum og áhoyrarum hava sum heild verið sera jalig, og eftirspurningur eftir at sleppa at halda áfram við hesum royndum, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum, er stórur. Margarinfabrikkin er jaliga sinnað at halda áfram sum samskipari av tiltakinum, men hevur ikki fíggjarliga umstøður at rinda tað, sum hetta kostar í samsýningum til starvsfólk og vasking, leigu av tónleikaanleggi, vaktarhald v.m., kostnaðarmett til kr. 150.000 árið út.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at játta Margarinfabrikkini 150.000 kr. at umsita royndartiltakið, soleiðis at royndirnar kunnu halda áfram, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 150.000 av reguleringskontoini.

Málið verður sent mentamálanevndini til kunningar.

**Mentamálanevndin 17. september 2008:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Tikið av skrá.

**Uppískoyti:**
Mayfinn Norðoy, arkitektur, leggur uppskotið fram og greiðir frá tí.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Nevndin samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan at gera kjallahæddina, og onnur neyðug arbeiði í tí viðfanginum.

**Ískoyti:**
Eina tíð hevur tilfar við uppskoti um, hvussu Reinsaríið kann endurnýggjast ligið hjá umsitingini. Mentamálanevndin varð kunnað um innihaldið í uppskotinum, sum Mayfinn Norðoy, arkitektur, hevur gjørt á seinasta fundi.

Viðmerkjast skal, at avmarkaðir møguleikar eru fyri kjallarahæddini, tí fyribilsloyvi er útgingið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at mentamálanevndin sum skjótast at gera uttanumøkið og kjallarahæddina í Reinsarínum í høvuðsheitum sambært hesum uppskoti.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at játta neyðugan pening til uttanumøkið/tún v.m. av íløgukonto Fríðkan av býnum í ár, har kr. 700.000 eru avsettar til endamálið.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at útvega upp til 2,5 mió. kr. av konto 6110 Umsitan av bygningum, til at gera kjallarahæddina í Reinsarínum í ár.

**Mentamálanevndin 10. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at gjørt er skitsuuppskot til innrætting og nýtslu av Reinsarínum, sambært býráðssamtykt frá 19. juni 2008, sum var lagt fyri á fundi í Mentamálanevndini 2. des. 2009, eigur politisk viðgerð av uppskotinum at fara fram í avvarðandi faknevndum og býráðið, og støða takast til uppskotið, áðrenn onnur stig verða tikin. Politisk eigur eisini at verða tikin støða til møguligar broytingar, og hvussu arbeiðið skal fíggjast, um hetta skal setast í verk. Samlaði kostnaðurin av skitsuuppskotinum er mettur til kr. 5.372.400 u. mvg og prosjektumsiting. Hesi viðurskifti eiga at verða avgreidd, áðrenn samtyktin í mentamálanevndini hin 10. febr. 2010 verður framd í verki.

Upplýsast kan, at tekniska umsitingin metir ikki, at heimild er fyri at rinda útreiðslur til hetta arbeiði av konto 6110, vísandi til at talan er um játtan til viðlíkahald av bygningum, og ikki til íløgur í innrætting til broytta nýtslu av bygninginum. Avsettar eru kr. 20.000 til vanligt viðlíkahald av bygninginum, trygging, streymnýtslu í fíggjarætlanini fyri 2010. Eisini kann leggjast afturat, at konto 6110 harumframt hevur hall frá 2009, sum verður framflutt til 2010, og sum skal sparast inn aftur. Sostatt er heldur ikki fíggjarligt rásarúm á konto 6110 til slíkt arbeiði.

Hinvegin eru kr. 700.000 avsettar á einum uppskotið fyri løgujáttan á konto 6275, sum umsitingin legði fyri teknisku nevnd í samband við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2010. Uppskotið er tó ikki endaliga staðfest í avvarðandi faknevndum og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Á hesum grundarlagið mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til,

1. at beina málið um uttanumsøkið/tún í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið við viðmæli um, at játtað upp til kr. 700.000 av konto 6275 til arbeiði
2. at arbeiði við uttanumsøkinum í høvuðsheitum verður framt sambært tekning hjá umsitingini
3. at mæla Mentamálanevndini til at leggja uppskotið hjá Mayfinn Norðoy, arkitekti fyri avvarðandi faknevndir og býráðið til politiska viðgerð

4. at beina málið um at gera kjallarahæddina aftur í Mentamálanevndina at útgreinað hvat nýtslan skal verða, og hvat skal gerast í kjallarahæddini, og at ávísa fígging, at leggja fyri fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan, vísandi til, at konto 6110 er ætla til viðlíkahald og ikki til íløgur, og at fíggjarligt rásarúm heldur ikki er á hesi konto.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Levi Mørk samtyktu at beina pkt. 1 og 2 í tilmælinum til teknisku nevnd og býráðið um fíggjarnevndina. Meirilutin samtykti eisini, at umsitingin til næsta fund ger eina ætlan fyri hvussu kjallarahæddin av Reinsarínum kann umvælast til spælistað v.m.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur støðu á seinri fundi.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Ein meirluti Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen, samtykti at mæla til, at beina pkt. 1 og 2 í omanfyristandandi tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina frá 1. mars 2010, í býráðið um fíggjarnevndina, og at vísa til samtyktina í máli nr. 2010-0544.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mayfinn Norðoy, arkitektur kemur at greiða frá um skitsuuppskotið. Tekniska umsitingin greiðir frá um fíggjarligu støðuna á konto 1082.90-82002.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Málið varð umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Vegna vantandi tilfar varð málið útsett.

**-Ískoyti:**
Arkitekturin hevur gjørt tillagingar til innrættingina av Reinsarínum, sambært samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 1. mars 2010. Eisini er gjørd fylgjandi kostnaðarmeting við stigvísari umbygging av bygninginum, sambært uppskotinum hjá arkitektinum.

2010: kr. 1.245.000
2011: kr. 2.235.000
2012: kr. 2.190.000
Tils.: **kr. 5.670.000** u. mvg, ókent, prosjektumsiting v.m.

Eins og í ískoytinum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 1. mars 2010 verður víst á, at tekniska umsitingin metir ikki, at heimild er fyri at rinda útreiðslur til hetta arbeiðið av konto 6110, vísandi til at talan er um játtan til viðlíkahald av bygningum, og ikki til íløgur í innrætting til broytta nýtslu av bygninginum. Avsettar eru kr. 20.000 til vanligt viðlíkahald av bygninginum, trygging, streymnýtslu í fíggjarætlanini fyri 2010. Eisini kann leggjast afturat, at konto 6110 harumframt hevur hall frá 2009, sum verður framflutt til 2010, og sum skal sparast inn aftur. Sostatt er heldur ikki fíggjarligt rásarúm á konto 6110 til slíkt arbeiði.

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 19. juni 2008, mæla tekniski stjórin og býararkitekturin á hesum grundarlagi til,

1. at mæla mentamálanevndini til at leggja dagførda uppskotið hjá Mayfinn Norðoy, arkitekti fyri avvarðandi faknevndir og býráðið til góðkenningar
2. at mæla mentamálanevndini, um fíggjarnevndina og býráðið at taka støðu til raðfesting av hesi íløgu, og at vísa á eina tíðarætlan og fígging til íløguna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**101/10** **<u>2009-0110 (sí eisini mál nr. 2010-1344)</u>**

**<u>Bussleið: útbjóðing 2010</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Nú Bussleiðin skal útbjóðast av nýggjum, eru tað nøkur viðurskiftir sum trímannabólkurin (Boði Haraldson, Jóannes S. Jensen og Katrin S. Nielsen) hava skift orð um, og sum skal umrøðast í teknisku nevnd:

**1. Farleiðirnar**.
Hvussu við núverandi leiðum og møguliga nýggjum farleiðum? Sum nú er dekka verandi farleiðir ein stóran part av økinum í Tórshavnar kommunu.
Eitt annað, sum eisini er vert at hava í huga er, hvussu langt skal tað verða frá teimum ymisku íbúðarøkinum til nærmasta bussstoppistað. Higartil hevur verið

arbeitt við at tað skal verða 300 – 350 metrar til nærmasta bussstoppistað. Kanska skuldi tað í framtíðini verðið 500 metrar til nærmasta bussstoppistað.

**2. Samstarv við Standfarskip Landsins SSL**
Møgulig samstarv við SSL (Bygdaleiðir) um farleiðina til Kollafjarðar og Velbastað/Kirkjubø?

**3. Jarðarferð**
Skal tað ásetast ein jarðarferðaleið, so at bussleiðin órógvast minst møguligt og ikki seinkast tá jarðarferðir eru inni í býinum.

**4. Bussar**
Hvat slag av bussum skal brúkast í tí nýggju útbjóðingini? Skal tað vera lágdyrkbussar og smærri bussar til útjaðaraøkini.

**5. Grønur profilur**
Skal tað kanska verða eitt krav, at ein EL-Bussar/Hybrid-bussur verður royndarkoyrdur í komandi loyvistíðarskeiðinum. Her verður serliga hugsað um umhvørviskrøv og hartil hoyrandi.

**6. Loyvistíðarskeið**
Hvussu langt skal loyvistíðarskeiðið verða í komandi útbjóðing? Skal tað verða 3 ár, 5 ár ella 7 ár?

**7. SMS-skipan**
Møguliga útbyggja eina SMS-skipan (ferðaætlan, seinkingar og avlýsingar), hetta fyri at kunna geva borgarunum, ið brúka bussleiðina, eina betri tænastu.

**8. Bussskúrarnir hjá Bussleiðini**
Ì komandi útbjóðingini skal komandi arbeiðstakari hava ábyrgdina av at viðlíkahalda endastatiónirnar hjá Bussleiðini.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Umsitingin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt notat um málið og kunnar um gongdina av útbjóðingini av bussleiðini 2010.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Katrin S. Nielsen kunnaði um status í málinum.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Katrin S. Nielsen kunnaði um málið. Nevndin samtykti at halda serstakan fund at viðgera uppskot til útbjóðingartilfar.

- Umsitingin leggur fram uppskot til útbjóðingartilfar.

**Tekniska nevnd 1. oktober 2009:** Umsitingin legði fram 1. uppskot til útbjóðingartilfar fyri bussleiðina. Nevndin ynskir at umsitingin arbeiðir víðari við

fyriliggjandi uppskoti fyri farleiðirnar og at útgreinað verður ítøkiligari kostnaðarmeting fyri leiðirnar 2 og 3 ferðir um tíman og leygardag og sunnudag.

**Ískoyti.**
Umsitingin leggur fram 1. uppskot til útbjóðingartilfar fyri bussleiðina við útdýpandi útgreiningum fyri leiðirnar 2 og 3 ferðir um tíman og leygardag og sunnudag sambært nevndarsamtykt frá 1. oktober 2009.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2009:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram 2. uppskot til útbjóðingartilfar. Harumframt verður framlagt tilfar til prekvalifikatión til støðutakan.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Halla Samulsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at mæla býráðnum til at samtykkja fylgjandi:

**1.** At bjóða áhugaðum arbeiðstakarum ella samtøkum at senda umbøn um prekvalifikatión sambært skjal nummar 2009-0110/33.
**2.** At sáttmálaskeiðið verður 7 ár.
**3.** At bussarnir við sáttmálabyrjan, skulu vera í mesta lagið 2 ár.
**4.** At koyrt verður 3 ferðir um tíman, frá uml. kl. 07.30 til uml. kl. 17.00.
**5.** At koyrt verður leygardag frá kl. 10.00 til kl. 16.00.
**6.** At koyrt verður ikki sunnu- og halgidagar.
**7.** At tann síðsti tímin frá 23.00 til 24.00 verður spardur burtur.

**8.** At heimila umsitingini at samráðast við SSL (Bygdaleiðir), um samstarvs-avtalu at leggja fyri nevndina aftur.
**9.** At bert eitt samlað tilboð verður, innihaldandi allar leiðir.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið fyri læstum hurðum 17. desember 2009:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti við teirri útgreining, at talan er um ein leist hjá umsitingini at arbeiða eftir.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram 3. uppskot til útbjóðingartilfar saman við teimum seinastu broytingum.

Ì sambandi við farleiðina til Kollafjarðar, verður tað seinasta uppskotið til sáttmála við SSL lagt fram. Uppskotið í sáttmálanum leggur upp til, at Tórshavnar kommuna rindar max. kr. 1. mill. um árið til SSL, og tá hava allir borgararnir í kommununi møguleikan at brúka farleiðirnar hjá SSL innanfyri kommunumark.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Levi Mørk og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka undir við framlagda uppskoti um tíðarætlan, uppskot til sáttmála við SSL og 3. uppskot av útbjóðingartilfarinum (j nr 2009-0110/44), og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge mælir til, at útbjóðingartilfarið letur upp fyri møguleikanum at geva alternativ tilboð upp á busskoyringina, ið leggja dent á CO2-sparing og umhvørvisvinarligar loysnir.

Meirilutin mælir býráðnum til at taka undir við avgerðini hjá teknisku nevnd tann 14. januar 2009. Aftur fyri fíggjarnevndina, áðrenn avgerð verður tikin um, hvør kann bjóða upp á busskoyringina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 28. januar 2010:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur mett um tíðarætlanina og staðfestir, at út frá fyriliggjandi fortreytum ber ikki til at seta nýggju koyringina í verk til tann 1. oktober 2010.

Vist verður til tilmælið til fundin í teknisku nevnd tann 14. januar 2010 um at leingja verandi sáttmálar til 31. desember 2010.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt at leingja sáttmálarnar til 31. desember 2010.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á borgarafundi við kollfirðingar fingið ymsar viðmerkingar til útbjóðingina og eisini havt kunnandi fundir við staðbundnar nevndir í Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø.

Endurskoðað tíðarætlan fyri útbjóðingina av Bussleiðini verður framløgd á fundinum. Umsitingin sær ikki nakran møguleika fyri, at koyringin við nýggjum sáttmálaparti kann koma í gongd 1. okt. 2010, uttan so at stig verða tikin til at bíleggja framleiðslu av bussum nú, orsakað av longum veitingartíðum fyri nýggjar bussar.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Kunnað var um málið.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ìskoyti:**
Umsitingin leggur fram 4. uppskot til útbjóðingartilfar. Tær seinastu broytingarnar eru gjørdar við støði í borgarafundinum í Kollafirði, fundi við umboðini fyri tær staðbundnu nevndirnar i Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø og hugaráksfundi. Umsitingin hevur arbeitt víðari við at fáa ynsktu broytingarnar við í 4. uppskot til útbjóðingartilfar.

1. At bussurin úr Kollafirði steðgar við Sandvíkarhjalla á veg suður til Havnar. Tað viðførur, at ein busslummi skal gerast í samstarvi við SSL og Landsverk. Útreiðslurnar til hesar fysisku karmarnar eru uml. kr. 250.000.

2. Er tað ikki nokk av plássi í bussinum hjá SSL at flyta øll tey ferðandi úr Kollafirði til Havnar og aftur, so skal tað verða nevnt í útbjóðingartilfarinum; at ein av eykabussunum við trygdarbelti verður brúktur at koyra fyrsta túrin kl. 07.10 frá Norðuri í Sundum og til Havnar og runt í Havnini og ein túr kl. 16.15 úr Havn norður til Kollafjarðar.

3. Tá tað er meira enn 20 min. at bíða eftir næsta bussinum hjá SSL uppi við tunnilsmunnan, so koyrir innanhýsis bussurin í Kollafirði leið 5 ikki niðan til tunnilsmunnan.

4. Broyting av ferðaætlanini, nær farleið 4 (Kaldbak – Kirkjubø retur) koyrir. Ætlanin var at koyra frá kl. 07.00 – 11.00 um morgunin og so aftur frá kl. 13.00 – 21.00 um kvøldið, men mælt verður til at koyra frá kl. 07.00 – 09.00 og so aftur frá kl. 11.00 – 23.00 um kvøldið.

5. At leið 4x (6) koyrir leygardagar kl. 10.00 úr Kaldbak – Tórshavn og aftur kl. 14.00 Tórshavn – Kaldbak.

6. Støddin av bussparkini verður íalt 16 bussar: 12 stórir bussar og 4 smáir.

Umsitingin kemur at kunna um úrslitið av seinastu ferðafólkateljingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingur og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við broytingunum.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Jákup Símun Simonsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endaligt uppskot til útbjóðing og kunnar um støðuna í málinum.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen og Levi Mørk, tók undir við framlagda endaliga uppskotinum (j. nr 2009-0110/71) til útbjóðing av Bussleiðini, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2010:** Deildarleiðarin á teknisku deild greiddi frá málinum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge, mæla býráðnum til at taka undir við útbjóðingartilfarinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen tekur undir við tilmælinum.

Greiddi ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Anfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Framhald av málinum, herundir viðgerð at lisitatiónsúrslitinum, er nýtt mál, j. nr. 2010-1344.

**Tekniska nevnd 15. juni 2010:** Staðfest.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

102/10 **2010-1344 (sí eisini mál nr 2009-0110)**

**Innkomin tilboð í sambandi við útbjóðing av Bussleiðini í 2010**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Sambært útbjóðingartilfarinum varð biðið um tilboð uppá fylgjandi alternativir:

**Alternativ I**
11 stk. 12 m bussar uttan trygdarbelti, harav tveir eru eykabussar.
3 stk. 9 m bussar við trygdarbelti, harav ein er eykabussur.
2 stk. 9 m bussar uttan trygdarbelti, harav ein er eykabussur.

**Alternativ II**
9 stk. 12 m bussar uttan trygdarbelti, harav tveir eru eykabussar.
3 stk. 9 m bussar við trygdarbelti, harav ein er eykabussur.
4 stk. 9 m bussar uttan trygdarbelti, harav ein er eykabussur.

**Alternativ III**
7 stk. 12 m bussar uttan trygdarbelti, harav tveir eru eykabussar.
3 stk. 9 m bussar við trygdarbelti, harav ein er eykabussur.
6 stk. 9 m bussar uttan trygdarbelti, harav ein er eykabussur.

Inn komu 5 tilboð:

| kr. | MB-Bussar Tilboð 1 | MB-Bussar Tilboð 2 | MB-Bussar Tilboð 3 | Gundurs Bussar | HK-Bussar & Stig Thomassen |
|---|---|---|---|---|---|
| Alternativ I | 20.086.784 | 19.791.872 | 19.562.496 | 22.861.111 | 19.496.841 |
| Alternativ II | 20.086.784 | | | 22.713.328 | 19.373.002 |
| Alternativ III | 20.086.784 | | | 22.565.218 | 19.234.699 |
| Nýtt alt. IV | | | | 22.935.166 | |

Víst verður til málsgongdina í máli nr. 2009-0110. Í sambandi við lisitatiónina, ið var hildin 31.05.2010, hevur umsitingin kannað innkomnu tilboðini. Greitt verður frá úrslitinum.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin hevur viðgjørt innkomnu tilboðini og gjørt notat í málinum (j. nr 2010-1344/10). Somuleiðis hevur tekniska umsiting ráðført seg við Løgdeildina um løgfrøðislig viðurskifti í málinum.
Vísandi til at innkomnu tilboðini ikki lúka fult út tær ásetingar, ið settar eru í útbjóðingartilfarinum, er tað ikki ráðiligt at arbeiða víðari við nøkrum av innkomnu tilboðunum á fyriliggjandi grundarlagi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum, tí øll teirra hava manglar í mun til ásettu krøvini í útbjóðingartilfarinum, og at annulera útbjóðingina. Mælt verður í staðin til, at busskoyringin verður boðin út av nýggjum til teir somu tilboðsgevararnar sum áður eru undangóðkendir, við styts møguligari freist, og at útbjóðingartreytirnar verða óbroyttar við undantak av at tíðarætlanin fyri nær nýggir bussar verða settir í rakstur, verður longd til 1. apríl 2011.

**Tekniska nevnd 15. juni 2010:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 22. juni 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir meirilutin til at biðið verður um alternativt tilboð uppá at leið 1, 2 og 3 við koyring 2 túrar um tíman.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at havna øllum tilboðum og at taka upp samráðingar við MB Bussar og Gundurs Bussar um nýggjan 7 ára sáttmála.

Ein annar minniluti, Jákup Símun Simonsen, mælir til at taka av tilboðnum frá MB Bussum og taka upp samráðingar við veitaran við møguligum sparingum í hyggju.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur í framhaldi av samtyktini í teknisku nevnd frá 22. juni 2010 gjørt metingar um broytingar av at koyrt verður 2 túrar um tíman á leið 1, 2 og 3.

Umstingin kemur at greiða frá broytingum í kostnaðinum fyri bussleiðina og hvørja ávirkan hetta hevur á talið av bussum. Harumframt verður greitt frá hvørjum alternativi, ið er best hóskandi til broyttu fortreytirnar. (Sí skjal nr. 2010-1344/16)

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Ein minniluti, Heðin Mortensen og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og biðja um alternativt tilboð fyri leið 1, 2 og 3, har koyrt verður 2 ferðir um tíman, og at tað í samband við nýggja útbjóðing bert verður biðið um tilboð uppá alternativ II í útbjóðingartilfarinum, ið er soljóðandi:

**Alternativ II**
9 stk. 12 m bussar uttan trygdarbelti, harav tveir eru eykabussar.
3 stk. 9 m bussar við trygdarbelti, harav ein er eykabussur.
4 stk. 9 m bussar uttan trygdarbelti, harav ein er eykabussur.

Harumframt mælir meirilutin til at freistin fyri innlating av tilboðunum verður hin 12. juli 2010, og at nýggja bussleiðin skal verða sett í rakstur í seinasta lagi hin 1. apríl 2011.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Jógvan Arge, mælir býráðnum til at havna øllum tilboðum og at taka upp samráðingar við MB Bussar og Gundurs Bussar um nýggjan 7 ára sáttmála.

Ein minniluti, Elin Lindenskov tekur støðu á einum seinni fundi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við minnilutanum Jákup Símun Simonsen í teknisku nevnd.

**Býráðið 24. juni 2010:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Gunnar Mohr og Anfinn Brekkstein, um at havna øllum tilboðunum og at taka upp samráðingar við MB Bussar og Gundurs Bussar um nýggjan 7 ára sáttmála, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Gunnar Mohr og Anfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Heðin Mortensen og Marin Katrinu Frýdal, í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Gunnar Mohr og Anfinn Brekkstein

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

**103/10** **<u>2004-2542 (sí eisini mál nr. 2003-1537)</u>**

**<u>Vegurin Langi - við ognina hjá P/F Kaj Andreassen (matr. nr. 1æg, Hoyvík)</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Formaðurin ynskir at nevndin viðgerð spurningin um stóra hæddarmunin millum vegøksl á Vegnum Langa og sprongda økið inni á ognini hjá p/f Kaj Andreasen. Í sambandi við byggiarbeiðið á ognini matr. nr 1æg, hevur eigarin grivið seg tætt

undir vegkassan á Vegnum Langa og spurningur verður settur við stabilitetin á vegnum fram við SEV-kisokini umframt tryggleikan hjá ferðslu og fótgangarum.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 27. oktober 2005:** Nevndin samtykti at bíða við at taka avgerð í málinum vísandi til nevndarsamtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 18. oktober 2005 og fíggjarnevndini 26. oktober 2005 í máli nr. 2003-1537.

- Umsitingin leggur fram uppskot til útgangandi skriv.

**Tekniska nevnd 26. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til útgangandi skriv.

- Formaðurin í teknisku nevndini ynskir at viðgera málið í nevndini.

Umsitingin greiðir frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Nevndin samtykti at heita á kommunustjóran og løgdeildina, at fáa málið loyst sum skjótast um neyðugt við rættarinnar hjálp.

- Umsitingin kunnar um støðuna í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nógv samskifti hevur verið millum Tórshavnar kommunu og P/F Kaj Andreasen. Umsitingin hevur fingið kostnaðarmetingar av ymsum loysnum frá Landsbyggifelagnum, og er P/F Kaj Andreasen kunnað um hesar kostnaðarmetingar. Samskifti um loysn á málinum er endað úrslitaleyst, tí P/F Kaj Andreasen hevur ikki á nakran hátt játtað at standa við gamlar avtalur og treytir fyri byggingini av virkisbygninginum við Vegin Langa. P/F Kaj Andreasen hevur tí í avgerðarskirivi dagf. 26. aug. 2009 fingið at vita, at kommunan fer undir at flyta tilfar o.a, ið liggur á kommunalu grannaognini, fyri eigarans rokning. Harumframt er boðað frá, at kommunan fyrireikar eina útbjóðing fyri gerð av arbeiðinum at stoypa betongarð fram við markinum til Vegin Langa.

Umsitingin metir, at tað er ikki haldbart fyri kommununa, at grivið er tætt undir vegkassan á Vegnum Langa, og at spurningur kann setast við stabilitetin á vegnum fram við SEV-kisokini umframt tryggleikan hjá ferðslu og fótgangarum. Umsitingin er tí av tí áskoðan, at neyðug trygging av vegkassanum og SEV-kioskini eigur ikki at bíða longur, tí onki røkist fyri, at P/F Kaj Andreasen hevur í hyggju at gera nakað við støðuna, sum er íkomin av hansara grevstrararbeiði.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært fyribilsmetingum fer tað at kosta uml. kr. 750.000,- at gera betonstuðlamúr. Víst verður í hesum sambandi til útreiðsluskjal nr 2003-1537/38.

Fyri at kommunan skal fara undir arbeiðið er neyðugt at fígging er tøk. Tískil verður mælt til at fáa játtaðar kr. 750.000. til arbeiðið, soleiðis at farast kann undir at bjóða arbeiðið út í almenna lisitatión.

Samstundis verður mælt til at boða P/F Kaj Andreasen frá, at Tórshavnar kommuna fer at krevja P/F Kaj Andreasen eftir endurgjaldi fyri útreiðslurnar kommunan fær av málinum, um neyðugt við at leggja málið fyri rættin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á løgdeildini mæla til:

- at fyribils verða játtaðar kr.750.000 til arbeiðið
- at umsitingin fær heimild at seta í gongd projektering, og at loysnin verður sambært tekningunum, sum liggja til grund fyri byggiloyvinum til P/F Kaj Andreasen
- at umsitingin fær heimild at bjóða arbeiði út í almennari lisitatión
- at umsitingin fær heimild at takað av lægsta tilboðnum, treytað av at samlaða metingin tá er innanfyri játtaða fíggjarkarmin.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og at figgja av konto 90.

**Býráðið fyri læstum hurðum 17. september 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at taka undir við samlaðu fíggjarligu viðurskiftunum, ið eru lýst í málinum til fíggjarnevndarfundin 9. september 2009.

- Formaðurin ynskir at fáa málið fyri nevnd.

**Tekniska nevnd 24. september 2009:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina, um at tryggja at kommunala grannaognin, matr. nr. 1nd Hoyvík, verður ruddað, smb. avgerðarskrivi frá 26. august 2009, soleiðis at farast kann undur arbeiðið at tryggja Vegin langa.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við at gera eina trýpartaavtalu millum kommununa, SEV og eigaran av matr. nr. 1 æg, Hoyvík, um niðurtøku av transformarastøðini hjá SEV, og at tað samstundis verður gjørd ein avtalu millum eigaran og Tórshavnar kommunu um gerð av stuðlamúri, at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur undir við at gera eina trýpartaavtalu millum kommununa, SEV og eigaran av matr. nr. 1 æg, Hoyvík, um niðurtøku av transformarastøðini hjá SEV og vísir til samtyktina í býráðnum 17. sept. 2009.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við fyrireikingunum at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út sambært fíggjarnevndarsamtykt tann 9. september 2009, og er útbjóðingartilfarið nú klárt at senda út. Áðrenn farið verður víðari við málinum um at fyrireika eina útbjóðing at gera stuðlamúrin fram við Vegnum Langa, skal støða takast til hvussu farast skal fram við útbjóðingini, við atliti til meirilutasamtyktina 12. nov. 2009 um at gera avtalur við partarnar í málinum.

Tekniska fyrisitingin kunnar um tekniska partin, og løgdeildin leggur fram uppskot til høvuðspunktir í avtaluni millum TK og eigaran av matr. nr. 1 æg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á løgdeildini mæla til:

1. at góðkenna tekniska prosjektið/útbjóðingartilfarið
2. at góðkenna høvuðspunktini til avtalu millum TK og eigaran av matr. nr. 1 æg, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at senda pørtunum avtalu-uppskotini til viðmerkingar at svara kommununi seinast týsdagin 8. desember 2009, kl 16.00.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Vísandi til svarskriv frá Kaj Andreasen & Co, dagfest 8. desember 2009, samtykti nevndin ikki at taka undir við uppskotinum hjá SEV um eina trípartaavtalu viðv. SEV-trafo støðini, men at halda fast við býráðssamtyktina 17. september 2009.

Samstundis varð samtykt at boða SEV og Kaj Andreasen & Co frá, at kommunan fer undir at bjóða arbeiði at gera stuðlamúrin framvið Vegnum Langa út fyrst í 2010, og at SEV og Kaj Andreasen & Co hava freist til 18. desember 2009 at boða kommununi frá, um semja er millum teir um at flyta SEV-trafo støðina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað arbeiðið at gera stuðlamúr út.
Lisitatiónin verður hildin týsdagin 27. apríl 2010.
Umsitingin leggur fram lisitatiónsprotokoll til støðutakan.

**Tilmæli:**

Býðarverkfrøðingurin og leiðarin fyri plan- og rakstradeildini mæla til, at umsitingin tekur upp sammráðingar við partarnar fyri at finna eina loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samskifti við umboð fyri Kaj Andreasen & Co og kunnað um úrslitið av lisitatiónini og kanna møguleikarnar fyri at finna eina loysn í málinum um stuðlamúr. Umboðini hava víst á, at tey ikki taka undir við fyriliggjandi projekti og hava ætlanir um sjálvi at gera eitt projekt til støðutakan.

Kunnað verður um lisitatiónsúrslitið og gongdina í málinum annars – herundir kærumálið til LUM, mál nr. 2010-0532.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Støða skal takast til spurninginin viðv. útlegg til projektering v.m av útbjóðingini. Higartil eru goldnar kr. 305.693,50 til forkanning, projektering og útbjóðing, og er peningurin higartil goldin av rakstrarkonto 1313-147923.

Sambært útrokningum frá ráðgevanum, ið taka støði í innkomna tilboðnum, verður kostnaðurin fyri gerð av stuðlamúrinum kr. 1.171.962,76, so at samlaði kostnaðurin fyri loysn av stuðlamúrinum er kr. 1.477.658,07 (u/mvg). Útreiðslur fyri kommunala málsviðgerð eru ikki tiknar við.

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt hin 17. sept. 2009, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at fara undir gerð av stuðlamúri sambært uppskoti (E1).

**Tekniska nevnd 15. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at avlýsa útbjóðingina og bjóða arbeiðið út aftur av nýggjum millum fleiri smærri arbeiðstakarar.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**104/10** **2010-1434 BH**

**Flagging í sambandi við norðurlendskar tjóðardagar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Forkvinnan í teknisku nevnd ynskir at viðgera spurningin um bussarnir undir bussleiðini skulu flagga, tá ið norðurlendskir tjóðardagar eru. Sambært útbjóðingartilfarinum í mál nr. 2009-0110 eru eingi krøv sett um flagging í sambandi við slíkar dagar. Ynski er tí, at nevndin skal taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd 15. juni 2010:** Nevndin samtykti, at bussarnir flagga við norðurlendskum fløggum tá ið tjóðardagar eru, og at hetta verður tikið við í komandi buss-sáttmála. Nevndin samtykti eisini at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**105/10** **2009-1584 GHM/AMDO**

**Umsókn frá Høgna V. Danielsen um at nýta inngongdina frá Gríms Kambans gøtu til gestir hjá Gourmet á ovaru hædd, matr. nr. 195, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Høgni V. Danielsen søkir við skrivi dagfest 14.06.2009, um loyvi til at nýta inngongdina frá Gríms Kambans gøtu til gestir hjá Gourmet á ovaru hædd. Sum er ganga gestirnir inn frá Skálatrøð, har eisini gestirnir hjá Glitnir sum halda til í niðaru hædd ganga inn. Hetta er til ampa fyri gestirnar hjá Gourmet.

Umsitingin hevur havt fund við Høgna V. Danielsen eigara og Leif Sørensen leiðara. Ætlanin er ikki at byggja nakað afturat, tó verður neyðugt at gera ein 1,3 m breiðan platt og rampu uttanfyri.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Upplýsingar frá umsitingini:
Tá byggingin á matr. nr. 195 fór fram var nógv stríð millum umsøkjaran og kommununa og millum umsøkjaran og grannan matr. nr. 193.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

Fíggjarligt:
Ongar bindingar fyri kommununa.

Skjøl:
Umsókn, journalnr. 2009-1584.
Myndir

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at málið verður sent grannunum til ummælis.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið er sent til grannahoyringar og freistin er úti 21.09.09. Møgulig mótmæli verða lisnar upp á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. september 2009:** Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti, treytað av at viðurskiftini viðvíkjandi undirlendinum koma í rættlag og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at løgdeildin fyrireikar ein leigusáttmála til brúksrætt til økið. Í fíggjarnevndina aftur.

**Ferðslunevndin 30. november 2009:** Málið er útsett til málið viðvíkjandi Gríms Kambans gøta, j.nr 2009-2421, er avgreitt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2010:** Vísandi til at eingin gjøgnumkoyrandi ferðsla er á Gríms Kambans gøtu longur, metir ferðslunevndin at einki er til hindurs fyri at ganga umsóknini á møti.
Málið verður beint í teknisku nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til ikki at ganga umsóknini á møti, vísandi til at Gourmet er latið aftur, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**-Ískoyti 12. apríl 2010:**

Nýggj umsókn er komin frá Hans Andreasen um at nýta inngongdina frá Gríms Kambans gøtu til gestir hjá Írsku Pub, fyrrverandi Gourmet, á ovaru hædd, matr. nr. 195, Tórshavn.

Nýggi umsøkjarin er í fer við at gera eina Írska Pub í hølinum har Gourmet var fyrr. Søkt verður við skrivi dagfest 24.03.2010, um loyvi til at nýta inngongdina frá Grím Kambansgøtu á ovaru hædd.

Grundin til at Gourmet ynskti at fáa eina inngongd í erva var, at Gourmet var ein fínari matstova og at tað tí hóskaði seg illa hjá teirra gestum at nýta somu inngongd sum gestirnir hjá Glitnir, sum er ein barr.

Tá ið bygningurin (Kvøldlot) varð bygdir av nýggjum, varð semja gjørd millum eigaran Høgna Danielsen, grannan og kommununa. Ein partur av hesi semju var, at eingin inngongd skuldi verða frá Gr. Kambandsgøtu.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Vísandi til, at nýggj umsókn er komin inn, beinir fíggjarnevndin málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina til nýggja viðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti, vísandi til at Gourmet er latið aftur, og hartil at ovara hædd og niðara hædd hava sama slag virksemi og tí, verður mett, kunna brúka somu inngongd, t.v.s. inn frá Skálatrøð, har eisini gestirnir hjá Glitnir sum halda til í niðaru hædd ganga inn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Levi Mørk heldur fast við samtyktina sum nevndin gjørdi 21. september 2009. Ein minniluti Elin Lindenskov mælir til at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina til viðmerkingar áðrenn støða verður tikin til málið.

**Ískoyti:**
Loyvisnevndin hevur fingið viðm. frá heilsu- og umhvørvisdeildini 4. juni 2010 til hoyringar. Tað fyriliggja ongar viðm. frá loyvisnevndini enn.

Vísandi til meting ferðslunevndarrinnar frá 10. mars 2010, eru ikki ferðslulig viðurskifti, ið tala ímóti at hava inn- og útgongd niðan móti Gríms Kambans gøtu.

Hinvegin verður víst á, at frá teimum royndum sum eru við líknandi virksemi aðrastaðni í býnum er sannlíkt, at ein inn- og útgongd niðaneftir kann føra til øktan larm og ampa fyri grannalagið. Her skal vísast á, at tá ið bygningurin (Kvøldlot) varð bygdur av nýggjum, varð semja gjørd millum eigaran, grannan og kommununa. Ein partur av hesi semju var, at eingin inngongd skuldi verða frá Gr. Kambans gøtu. Onki er í nýggju nýtsluni av hølunum til írska pub, ið talar fyri, at broyta umhvørvisligu treytirnar, um ikki at loyva inn- og útgongd niðaneftir.

Onki er í vegin fyri at Irish Pub kann virka á fullgóðan hátt, uttan at hava inn- og útgongd í Gr. Kambans gøtu. Verandi hurð er og skal framvegis verða neyðútgongd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini vísa til tilmælið til byggi- og býarskipanarnevndina 26. apríl 2010 og til upprunaliga semju, ið gjørd er um ikki at loyva inngongd frá Gríms Kambans gøtu, og mæla frá at ganga umsóknini á møti. Somuleiðis verður mælt til at at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina at ummæla umhvørvisligu viðurskiftini í sambandi við umsóknina.

**Tekniska nevnd 15. juni 2010:** Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Levi Mørk, samtykti at ganga umsóknini á møti, treytað av at viðurskiftini viðvíkjandi undirlendinum koma í rættlag og at beina málið í fíggjarnevndina.
Ein annar minniluti, Marin Katrina Frýdal og Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein triði minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at beina málið til ummælis í heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Tilmæli:**
Vísandi til

- tær royndir, sum eru við líknandi virksemi aðrastaðni í býnum er sannlíkt, at ein inn- og útgongd niðaneftir kann føra til øktan larm og ampa fyri grannalagið.
- at tá ið bygningurin (Kvøldlot) varð bygdur av nýggjum, varð semja gjørd millum eigaran, grannan og kommununa, har ein partur av hesi semju var, at eingin inngongd skuldi verða frá Gr. Kambans gøtu,
- at onki er í nýggju nýtsluni av hølunum til írska pub, ið talar fyri at broyta umhvørvisligu treytirnar, um ikki at loyva inn- og útgongd niðaneftir.
- at onki er í vegin fyri at Irish Pub kann virka á fullgóðan hátt, uttan at hava vanliga inn- og útgongd í Gr. Kambans gøtu
- og at tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina annars viðmæla at geva Irish Pub matstovu-, dansi- og skeinkiloyvi,

mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina frá at ganga umsóknini um vanliga inn-/útgongd frá Gr. Kambans gøtu á møti, men at verandi hurð eins og higartil verður at nýtast sum neyðútgongd. Tó verður mælt til at víðka um loyvi til nýtsluna av hesi hurð, til eisini at kunna nýtast sum inn- og útgongd hjá gestum í koyristóli, og at loyvi verður givið til at gera rampu uttanfyri einans til hetta endamál, eftir ávísingum frá umsitingini.

Eisini verður mælt til at seta sum treyt, at brot á loyvdu nýtsluna av nevndu neyðhurð móti Gr. Kambans gøtu, og brot á treytirnar í matstovu-, dansi- og skeinkiloyvinum viðføra at, at nevndu loyvir kunnu verða tikin aftur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2010:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum. Ein minniluti, Bogi Andreasen og Jan Christiansen, heldur fast við samtyktina sum byggi- og býarskipanarnevndin gjørdi tann 21. september 2009. Málið beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Málið útsett til seinni fund.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**106/10** **<u>2010-0103</u>**

**<u>Umsókn frá Hotel Hafnia at fáa brúksrætt til økið frammanfyri Kafe Kaspar í sambandi við útiveiting.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í umsókn, sum Tórshavnar kommuna hevur móttikið 13. januar 2010 hevur Hotel Hafnia søkt um loyvi at nýta økið framman fyri Kafe Kaspar til at seta borð og stólar í sambandi við útiveiting frá kaféini, sí tekning í skjali 2010-0103/1.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir fíggjarnevndini til at vísa umsøkjaranum á møguleikan at søkja fyribils um hissini loyvi at nýta umrødda øki og annars til at beina umsóknina til viðgerðar í viðkomandi faknevndum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, heilsu- og umhvørvisnevndina og teknisku nevnd til ummælis.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- umhvørvisdeildini mæla til at játta hissiniloyvi, tá allar treytir viðv. matstovu-, skeinki-, og dansiloyvi eru í lagi, og at fylgja reglugerðini fyri útiservering, tá hon kemur í gildi.

**Tekniska nevnd 22. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 21. juni 2010 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Hissini søluloyvi verða latin av borgarstjóranum. Málið verður avgreitt av umsitingini.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**107/10** **2010-0771**

**Umsókn frá Sunnevu Háberg Eysturstein vegna Sirkus Føroyar um at fáa brúksrætt til ein triðjing av torginum í Vágsbotni umframt økið framman fyri Sirkus Føroyar.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í umsókn, sum Tórshavnar kommuna hevur móttikið 25. mars 2010 hevur Sunneva Háberg Eysturstein vegna Sirkus Føroyar søkt um at fáa brúksrætt til ein part av torginum í Vágsbotni og økinum framman fyri Sirkus Føroyar í tíðarskeiðnum frá 1. mai til 31. august 2010, sí tekning í skjali 2010-0771/2.

Ætlanin er at nýta umrøddu øki til aktivitetir í sambandi við virksemið hjá Sirkus Føroyar, herundir útiveiting og uppsetan av sølubúð, borðum og stólum.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgeildini mælir fíggjarnevndini til at vísa umsøkjaranum á møguleikan at søkja fyribils um hissini loyvi at nýta umrøddu øki ella part av økjunum og annars til at beina umsóknina til viðgerðar í viðkomandi faknevndum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, heilsu- og umhvørvisnevndina og teknisku nevnd til ummælis.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- umhvørvisdeildini mæla til at játta hissiniloyvi summari 2010 í tíðarskeiðinum 10. juni til 30. september.
At økið og nýtslan av torginum er treytað av ásetingunum, sum eru settar í máli nr. 2009-2554/10.
Og tá reglugerðin fyri útiservering kemur í gildi, at fylgja henni.

Jan Christiansen var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 21. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 21. juni 2010 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Hissini søluloyvi verða latin av borgarstjóranum. Málið verður avgreitt av umsitingini.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

- Jákup Símun Simonsen fór av fundi, meðan mál nr. 108/10 varð viðgjørt

**108/10** **2010-0521/3 SG**

**Graslíki á vøllin við Eysturskúlan, sum er 75 x 47 m.**

Vøllurin við skúlan er ein grúsvøllur, sum ikki er brúkaravinarligur í tí standi hann er í. Við at umvæla vøllin við m.a. graslíki, verður hann eitt gott íkast fyri skúlan og eysturbýin.

Ein kostnaðarmeting er gjørd:

| | |
|---|---|
| 1. Niðurtøka, avgrevstur og burturkoyring av mold og sandi v.m. | 215.000 |
| 2. Drenrør at leggja og binda í verandi kloakk, íroknað brunnur | 15.400 |
| 3. Planering við 0-75mm, 0-16 mm og nýggj gøta | 339.000 |
| 4. Graslíki, íroknað gummigranulat undirlag og ífyllu av sandi | 1.260.000 |
| 5. Betongarbeiði, rimaverk, stólpar og hegt | 532.000 |
| 6. Ljósmastrafundament, 12 m høgar ljósmastrar 6 stk. | 117.000 |
| 7. Hamping av økinum kring vøllin | 50.000 |
| 8. Fótbóltsmál (2 stk. 5 m breið og 4 stk. Smærri) | 60.000 |

| | |
|---|---|
| Ókent uml. | 168.600 |
| Projektering og eftirlit | 143.000 |
| Tilsamans | 2.900.000 |

Allar upphæddir eru uttan MVG

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,9 mió kr. umframt mvg til gerð av graslíkisvølli til Eysturskúlan av kontu 4175 Dagføring av skúlum og at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Landsbyggifelagið hevur bjóðað arbeiði út uppá jørð, kloakk, betong og timburarbeiði, sum er mett at kosta 1.630.000,00.

Inn komu 3 tilboð:

| | |
|---|---|
| Articon | 1.577.517,00 kr. |
| Andreas Berg | 1.691.745,00 kr. |
| Maskinkoyring | 1.838.750,00 kr. |

Landsbyggifelagið hevur hugt eftir tilboðunum uppá jørð og betongarbeiði v.m., sum eru komin inn og mæla til at taka av tilboðnum frá Articon uppá kr. 1.577.517,00. Landsbyggifelagið mælir eisini til at taka av tilboðnum frá Polytan uppá kr. 1.049.150,00, sum tilsamans gevur kr. 2.907.709,00.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá Landsbyggifelagnum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og taka av tilboðunum frá Articon og Polytan.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**109/10** **<u>2008-4491/19 SG</u>**

**<u>Øki til eina nýggja hondbóltshøll til hondbóltsfelagið Neistan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umboð fyri Neistan møta á fundinum.

Málið er ikki viðgjørt í umsitingini.

**Mentamálanevndin 12. apríl 2002:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá hondbóltsfelagnum Neistanum, har søkt verður um at sleppa at fáa økið at byggja eina hondbóltshøll á.

Felagið vísir á økið í Marknagili, - matr. nr. 917, ið er ogn hjá TK og liggur, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j. nr. 2002-1012
Kortskjal av økinum: j. nr. 2002-1012

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Neistan í sambandi við at teir upprunaliga søktu um at sleppa at byggja høllina á Frælsinum.

Hesum noktaði umsitingin fyri og vísti tá á, at umsitingin arbeiddi við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata Neistanum økið, matr. nr. 917, at byggja eina hondbóltshøll á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður Neistanum at skipa soleiðis fyri, at høllin møguliga kann útbyggjast til eina dupulthøll.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við ætlanini at lata Neistan byggja eina hondbóltshøll á part av matr. nr. 917, og at restina av økinum verður avlagt til eina møguliga høll aftur at.

Eisini samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**<u>2002-1012</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917, við Landavegin í Tórshavn.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hondbóltsfelagið Neistin søkir um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917 við Landavegin í Tórshavn.
Útgangsstøðið fyri høllina er at gera eina høll, sum í stødd tekur støði í støddini á einum hondbóltsvølli, sum lýkur altjóða krøv til innandura hondbóltsvallir viðv. hædd, vídd og umstøðum til leikarar dómarar og áskoðarar.

Góðar umstøður verða til tey rørslutarnaði.

Bygningurin kann býtast upp í sjálvan hallarbygningi, og ein síðubygning, sum partvís er í tveimum hæddum. Samlaða víddin á bygninginum verður 2.945,4m².

Tað verða pláss fyri í alt 910 áskoðarum, harav tey 680 verða sitipláss.

Útveggir og tekjan verða klædd við profileraðum aluminiumsplátum. Vindeygu og úthurðar verða úr aluminium.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti D2 ítróttarøki, og er umsóknin viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 917, er 16.843 m² til víddar.
Byggistigið verður 0.17. Mest loyvda byggistig er 0.25.
Nettonýtslustigið verður 0.24. Mest loyda nettonýtslustig er 0.3.
Tal av bilstøðlum fult útbygt 273. Kravt tal av bilstøðlum 4117,4 / 50 = 82.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**

Fíggjarnevndin hevur samtykt á fundi 15. mars 2006 at játta kr. 7.250.000,- yvir 5 ár.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2002-1012.
Støðumynd í mát 1:1000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini at ganga umsóknini á møti, at senda málið til grannakunningar, og at útskriva byggiloyvi, tá aðrir myndugleikar, ið hava heimild at seta krøv, hava góðkent bygningina. Samstundis at beina málið í teknisku nevnd, í sambandi við ætlaða vegin fram við vestara markinum, sum skal samanbinda Landavegin og Marknagilsvegin, umframt eitt møguligt bussteðgipláss í sambandi við høllina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu av lendisspurninginum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Neistanum hóskandi/neyðugt lendi av matr. nr. 917 til bygging av ítróttarhøll við neyðugum uttanum øki til parkering v.m. við somu treytum og leiguupphædd sum aðrir ítróttarbygningar.

Tilsøgnin um leigu er treytað av, at byggingin er byrjað innan 2 ár.

**Býráðið 21. september 2006**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008**: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen..

**Ískoyti:**
Neistin ynskir at broyta sáttmálan so at tað verður Stuðlafelagið Neistin, sum kemur at standa sum leigari av grundøkinum, eigari av høllini og móttakari av stuðli. Harumframt ynskja teir at kravið í grein 3 í verandi sáttmála um grundøkið viðvíkjandi møguleikum fyri dupulthøll verður slept.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til skjóta viðgerð.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagfest 21.01.2010, biður Hondbóltsfelagið Neistin um broyting í leigusáttmálanum. Neistin ynskir, at grein 3 verður broytt, soleiðis at tann parturin av greinini, ið snýr seg um møguleikan at byggja eina høll afturat á økinum móti høllini hjá Neistanum, verður strikaður. Hesin partur er soljóðandi:

"Byggingin hjá leigaranum skal verða í mark á útnyrðingssíðuni (niðaneftir), byggingin skal, hvat konstruktiónum viðvíkur verða gjørd soleiðis, at tað í framtíðini ber til at byggja eina høll afturat á ovara partinum av stykkinum í mark móti høllini hjá leigaranum, og soleiðis at opnast kann millum hesar báðar hallir og at tær kunnu sláast saman til eina stóra høll í samband við serlig tiltøk (t.d. multiarena, landsdystir 0.l.).

**Býráðið 28. januar 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 10. februar 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska- og trivnaðarumsitingin eru av kommunustjóranum biðin um at lýsa málið í einum uppriti til viðgerðina í mentamála- og byggi- og býraskipanarnevndini.

Biðið verður um, at gongdin í málinum verður lýst við grundarlagi í teimum samtyktum, ið eru gjørdar í politisku nevndunum, samskiftinum við Neistan, innlatnum tilfari og avtalum umframt grundgevingum og tankum aftanfyri tær treytir, sum býráðið setti í sambandi við góðkenning av leigusáttmálanum. Biðið verður eisini um, at umsitingin á hesum grundarlagi ger eitt greitt tilmæli í málinum v.v ynskinum hjá Neistanum um at sleppa at broyta verkætlanina frá at byggja til dubulthøll.

Umsitingin hevur síðani gjørt upprit í hesum sambandi (j. nr. 2008-4491/16), har gongdin í málinum er lýst, umframt býarskipanarligu atlitini. Viðv. býarskipanarligu atlitunum kann leggjast afturat, at tekniska umsitingin metir, at nú nýggi bygningurin til skúladepilin í Marknagili er staðsettur og hevur fingið skap, styrkir hetta bert uppaftur meira uppundir, at øll bygging á ítróttarøkinum – matr. nr. 917 – inngongur í heildarskipanina av økinum, soleiðis sum upprunaliga ætlað. Umsitingin hevur í sambandi við skúladepilin havt fund við ráðgevar landsstýrisins um skipan av økinum, við støði í útkasti sum umsitingin hevur gjørt (j. nr. 2008-4491/17).

Gjøgnumgongdin í málinum vísir, at spurningurin um dupulthøll hevur verið viðgjørdur við Neistan líka síðani 2003, og at spurningurin somuleiðis hevur verið viðgjørdur politiskt. Og í samráðingunum uppundir at leigusáttmáli varð gjørdur fyri økið í 2008, var spurningurin eisini viðgjørdur bæði við Neistan og politiskt,

tá fíggjarnevnd og býráð einmælt samtyktu leigutreytirnar. Gjøgnumgongdin vísir tó eisini, at tørvur helst eisini er á at fáa eina samlaða skipan av ymsu viðurskiftunum í málinum, herundir veðrætt kommununar fyri higartil játtaða stuðulinum, íbinding í veg og kommunalar leiðingar, eins og spurningin um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012). Nógv av hesum viðurskiftum eru ikki partur av treytunum í leigusáttmálanum, tilsøgnini um stuðul, graviloyvi o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkitekturin og leiðarin á mentamáladeildini mæla frá at ganga umsøknini um at strika part av grein 3 í leigusáttmálanum, soleiðis sum søkt er um, men at umsøkjarin fær boð um at halda seg til treytirnar í leigusáttmálanum. Hetta vísandi til omanfyristandandi ískoyti og uppritinum um málsgongd, býarskipanarlig atlit v.m. (j. nr. 2008-4491/16), umframt at hetta vil oyðileggja seinasta møguleikan fyri eini stórhøll innanfyri ringvegin í høvuðsstaðnum. Økið er uml. 17.000 fermetrar til víddar, og tað vil verða at burturspillað økið og teir møguleikar sum økið gevur, at ganga umsøknini á møti. Og samstundis vil tað at ganga umsøknini á møti forða fyri, at onnur ítróttarfeløg ella kommunan kunnu fáa gagn av økinum. Tí verður mett sera umráðandi at planleggja langsiktað, við at hava møguleikan fyri at onnur ítróttarfeløg ella kommunan seinni kunnu byggja hina helvtina av høllini, og harvið fáa eina stórhøll í býnum.

Hinvegin verður tó víst á møguleikan, at taka spurningin um stuðul til byggingina hjá Neistanum upp til nýggja viðgerð, við støði í, at kommunan veitir ein nakað størri stuðul og samstundis leingir stuðulstíðarskeiðið, at dekka part av skjalprógvaðum eykaútreiðslum sum felagið fær av at venda berandi konstruktiónini soleiðis, at uppíbygging er møgulig. Hetta kann samstundis verða treytað av, at tað samstundis verður gjørd ein ískoytisavtala til leigusáttmálan ella ein serstøk rakstraravtala, um nýtslu av høllini til slík serlig tiltøk, sum ein dupulthøllin gevur møguleika fyri.

Somuleiðis eigur høvi at verða nýtt til at tryggja kommununi veðrætt fyri higartil játtaða stuðulin, og at avtala verður gjørd við Neistan um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012).

At enda verður mælt til, at Neistin fær ikki loyvi til at halda áfram við arbeiðinum tá planeringin er liðug, fyrr enn fullfíggjað prosjekt er latið kommununi at byggimálsviðgera.

Um Neistin ikki ynskir at ganga undir treytirnar sambært leigusáttmálanum, eigur leigusáttmálin at sigast úr gildi, og onnur staðseting at finnast til eina stakhøll, soleiðis sum Neistin ynskir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at gera eina avtalu við Neistan, sum verður at leggja fyri avvarðandi nevndir.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

Fíggingin
Verða kr. 7,75 mió lagdar aftrat áður játtaða stuðlinum, verður kommunali parturin av bygginini í alt kr. 15 mió, ella 60%. Áður játtaði stuðulin uppá kr. 7,25 mió er býttur yvir 5 ár, og eftir at gjalda er kr. 3.022.000 í 2011 og kr. 1.052.000 mió í 2012 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Árliga gjaldið til meirfíggingina kr. 7,75 mió pluss 6% p.a. í rentu yvir 10 ár verður uml. kr. 1.050.000.

Fyri ta meirfígging, sum kommunan skal lata fyri ávísan nýtslurætt í høllini, er roknaða leigan yvir kr. 800 um tíman (6 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna, 10 mðr um árið). Hetta er meira enn ferfalt leiguprísinum í kommunalu hallunum, og hóast at kommunan kann fáa gleði av nýtslurættinum til børn og ung – fyrst og fremst uttanfyri skipaðu ítróttafeløgini, so er hetta tó kostnaðarliga als ikki kommununi til fyrimunar.

Metast má vera sera óheppin gongd, um ítróttaverkløg, ið ítróttafeløg formliga standa sum byggiharrar og ánarar yvir, skulu hava 60% av byggikostnaðin játtaðan frá kommununi, harav 30% skulu eyðmerkjast sum nýtslugjald. Hetta er ikki í samsvari við siðvenjuna, at kommunan rindar 30% í stuðli. Tørva verkætlanir veruliga 60% í stuðli ella reellari fígging frá kommununi fyri at verða realiseraðar, so er rættari mannagongd, at kommunan sjálv stendur sum byggiharri og ánari, so at íløgan kann koma fleiri ítróttafeløgum til gagns.

Sum heild er talan um sera stóra og serstaka kommunala fígging til ítróttahøll hjá einstøkum felag, og sum onnur ítróttafeløg í útgangsstøðinum ikki fáa nakran ágóða av. Neistin hevur frammanundan 17,5 venjingartímar í Høllini á Hálsi. Kommunan eigur í minsta lagi at krevja hesar tímar frá Neistanum, so at kommunan fyri meirfíggingina til Neistan og ávísan nýtslurætt til nýggju høllina eisini kann skapa betri hallarumstøður til onnur ítróttafeløg í kommununi. Hetta eigur at verða avgjørt krav.

Skal kommunan binda seg til at játta og gjalda millióna brúksgjald komandi 10 árini, so eigur at verða gjørdur ein formligur sáttmáli hesum viðvíkjandi. Men uttan mun til hetta, er veruligi leigukostnaðurin so mikið høgur, at mælt verður frá hesi ætlan um meirfígging til bygginina.

Leigusáttmálin
Ynskið frá Neistanum um, at kommunan gongur frá kravinum um dupulthøll, krevur broyting í leigusáttmálanum. Sum omanfyri er lýst (málslýsingin til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 22. mars 2010), hevur staðsetingin av høllini beinleiðis samband við treytina um dupulthøll. Mælt varð tá frá broytingini, og hetta tilmælið stendur við.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla somuleiðis frá at játta kr. 7,75 mió pluss rentur yvir eitt 10 ára skeið aftrat teimum kr. 7,25 mió í stuðli, sum áður eru játtaðar til høllina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 7,75 mió í stuðli til høllina, at gjørdur verður leigusáttmáli um ókeypis nýtslurætt hjá kommununi í høllini, at lýst verður veð fyri meirjáttanini (7,75 mió kr.) í bygninginum í 25 ár, og at venjingartímarnir hjá Neistanum í kommunalu høllini á Hálsi koma øðrum ítróttarfeløgum til góðar.

Sambært ætlaða leigusáttmálanum um nýtslurætt skal kommunan í 10 ár fram eitt nú hava fyrsta rætt til at leiga høllina hvønn gerandisdag frá kl. 8 á morgni til kl. 14. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum, handilsstevnur og onnur størri tiltøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við mentalálanevndini, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Elin Lindenskov var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 21. juni 2010 og byggi- og býarskipanarnevndini 23. juni 2010.

Samtykt at mæla býráðnum til at játta 7,75 mió. kr. í stuðli, ið verður at útgjalda yvir 10 ár – í fyrsta lagi frá 2011. Stuðulin er treytaður av góðkenning frá landsstýrinum, smb. Roknskaparkunngerðini nr. 124. frá 22. desember 2000 um ábyrgdarbindingar, veðhald, v.m. sambært kommunustýrislógini.

Somuleiðis samtykt at mæla býráðnum til, at Tórshavnar kommuna fyri samlaðu stuðulsupphæddina á 15 mió. kr. fær veð í høllini fyri hesa upphædd.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**110/10** **2009-0479/33 TK-P**

**Sankta Frans skúli – smábarnaskúlin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grundøki:**
Matr. nr. 779 f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68
Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3, og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðs-umhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m² x 16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.

Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum, um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanar-nevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum.

Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

**at** alt ov nógv er bygt á økið sum er.
**at** ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.
**at** nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skógfriðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

Byggistig: 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m².

Sambært hesum uppskoti er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr. nr. 779b, soleiðis at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum til ber.

Henda ætlan innber, at matr. nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.

Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779f upp á 4 m breiðan vegaskap. Tekning j. nr. 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a. Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005:

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587-34.

Nýggj umsókn, dagfest 24. juli 2003, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum, har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420 m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26

Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið: 1676 : 6776 = 0,25. Nettonýtslustigið verður: 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779a standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779a og matr. nr. 779b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til, at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**Ískoyti:**
**Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla**.
Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendið er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.
Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 m².

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni 2005 metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøð-urnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og dispositiónsuppskot verða framløgd.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Brot úr byggiskránni:**
"Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Skt. Frans skúla. Nevndin er mannað av:

| | |
|---|---|
| Unnie Justinussen | Tórshavnar kommuna/tekniska fyrisiting |
| Høgni Joensen | Tórshavnar kommuna/trivnaðarfyrisitingin |
| Selmar Jacobsen | Skúlastjóri/Skt. Frans skúli |

Skrivari hjá nevndini er Rúni Abrahamsen MAP Arkitektar.

Tað hava verið gjørdar fleiri ætlanir at útbyggja Skt. Frans skúla, men lítið annað er hent enn onkrar hissini umvælingar.

Ein av orsøkunum at einki enn er hent, kann vera, at einki byggilendi er til skúlan. Onkur ætlan hevur verið at byggja niðaneftir móti viðalund og kleystrinum, men hesar eru steðgaðar av náttúrufriðingarnevnd og skógrøkt landsins. Fransiskanarar-systrarnar eiga eisini økið aftan yri skúrarnar við fimleikahøllirnar.

Kommunan hevur sent umsóknir til náttúrufriðingarnevndina, sum til síðst góðkendi eitt uppskot uppá 430 fermetrar í einari hædd, bygt har skúrarnir standa í dag. Náttúrufriðingarnevndin skal somuleiðis hava uppskotið til bygging til góðkenningar.

Hetta hevur verið útgangsstøðið hjá bygginevndini."

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til, at bygginevndin arbeiðir víðari við byggiskránni, har kostnaðurin verður kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgv.

Skúlastýrið í Sankta Frans skúla hevur biðið um fund við mentamálanevndina um ætlanirnar hjá nevndini um byggjan av nýggjum smábarnaskúla til forskúla og 1. flokk.

**Mentamálanevndin 28. mars 2006:** Mentamálanevndin møtti á fundi í Sankta Frans skúla, har nevndin hevði fund saman við skúlastýrinum.

Samtykt at viðgera málið aftur á næsta fundi í mentamálanevndini, sum verður týsdagin 4. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentamálaleiðaranum at byggja skúlabygning fyri kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgvi, tilsamans kr. 9 mió.

Nevndin samtykti eisini at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at bjóða arbeiðið út í umvendari licitatión og at fíggja arbeiðið av íløgum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og samtykt at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini og býararkitektinum:**
**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Sankta Frans skúla.

Nevndin kom við byggiskrá og uppskoti í mars 2006. Byggiskrá og uppskot var lagt fyri mentamálanevndina til støðutakan. Nevndin gjørdi somuleiðis vart við, at byggingin var viðbrekin, tí partur av grundøkinum er ogn hjá fransiskanarsystrunum, sum skuldu góðkenna uppskotið. Tí var uppskotið kanska dýrari enn líknandi bygging aðrastaðni. Somuleiðis hevur umhvørvið, skúlin og lendi ein dýrkandi leiklut.

Mentamálanevndin avgjørdi á fundi 4. apríl 2006 at senda verkætlanina út í øvutari lisitatión.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er í løtuni ikki til fyrimunar fyri hesum útbjóðingarhátti. Arbeiðstakarar hava ovmikið at gera. Hetta sæst ikki einans á teimum lisitatiónum, sum hava verið í seinastuni, men eisini tá ið arbeiðstakarar ítøkiliga verða spurdir, um áhugi er at bjóða upp á arbeiði eftir hesum leisti.

Av tí at arbeiðstakarar í Tórshavn ikki hava avvíst at bjóða upp á arbeiðið, men hava víst á, at hátturin er arbeiðskrevjandi, mælir bygginevndin og býararkitekturin til at broyta útbjóðingarháttin til høvuðsarbeiðstøku eftir prekvalifikatión, har tekniska umsitingin hevur møguleika at meta um hvønn einstakan arbeiðstakara við atliti at førleika, manning og fíggjarligum viðurskiftum.

Undanførleikametingin gevur grundarlag at bjóða arbeiðið út millum skikkaðar arbeiðstakarar antin í lisitatión, í undirhondsboði ella við samráðing alt eftir, hvussu nógvir arbeiðstakarar uppfylla minstukrøvini.

Ætlanin við undanførleikametingini er at staðfesta ítøkiligt, um áhugin hjá arbeiðstakaranum at bjóða er sakliga undirbygdur.

Til undanførleikametingina kann verða biðið um hesar upplýsingar:

1. Almenn lýsing av arbeiðstakaranum, so metast kann um kravda minstuorku bæði á tí fíggjarliga og á tí tekniska økinum.
2. Upplýsingar um fyriskipan og bygnaðin hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.
3. Váttan ella trúnaðarváttan, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
4. Avrit av viðkomandi vinnulívstryggingum.
5. Upplýsingar um eginogn og javna í roknskapi, tá ið søkt verður saman við einari váttan av samlaðu søluni hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
6. Váttan um árliga miðaltalið av fólki, sum starvast í fyritøkuni.
7. Ummæli frá líknandi uppgávum.
8. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkunum, ið verða knýtt at uppgávuni.
9. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.

**Tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum:**
Mælt verður til at taka undir við tilráðingini frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 1. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu beinanvegin.

**Býráðið 16. november 2006:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Hilduri Eyðunsdóttir um at taka undir við mentamálanevndini tann 1. november 2006, ið fall við 1 atkvøðu fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddi: Hildur Eyðunsdóttir

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Uppískoyti:**
Endalig góðkenning frá Náttúrufriðingarmyndugleikunum er ikki enn komin upp á pláss, men fyri at arbeiðið ikki skal draga út meira enn neyðugt, verður mælt til at projekteringin heldur áfram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mill. til projektering av útbjóðingartilfari til Sankta Frans skúla av íløgum fyri 2008.

**Mentamálanevndin 18. februar 2008:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Jan Christiansen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó so at peningurin ikki verður brúktur fyrr enn góðkenning frá náttúrufriðingarmyndugleikunum fyriliggur.

Ein minniluti, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**Lýsing av málinum:**
Fyri at arbeiðið við smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla kann halda fram, verður biðið um, at 3 mió. kr. í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2010 verða fluttar av íløgum hjá Eysturskúlanum til at fíggja framhaldandi projektering av smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla.

Í samband við umvælingarnar av Eysturskúlanum hevur mentamáladeildin umrøtt málið við Húsaumsitingina og skúlans leiðslu, og mett verður, at tær umvælingar, sum enn eru eftir at gera, kunnu bíða eina tíð.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 3 mió. kr. í framlagda uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2010 verða fluttar av íløgum hjá Eysturskúlanum til at fíggja framhaldandi projektering v.m. av smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyri at byggja smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla var neyðugt at keypa lendið, sum var partur av matr.nr. 779a og matr.nr. 779b til skúlan. Kostnaðurin fyri keypið er kr. 288.561,67.

Samráðingar hava verið við eigaran av lendinum, sum hevur játtað at selja kommununi uml. 1.394 fermetrar av matr. nr. 779a, og uml. 705 fermetrar av matr. nr. 779b (tilsamans uml. 2.099 fermetrar). Eisini eru øll neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikunum og skógfriðingarnevndini fingin til vega. Prísurin, sum kommunan kann ogna sær lendi fyri liggur langt undir vanligan marknaðarprís.

Víst verður til fíggjarnevndarsamtykt 13. apríl 2005, sum tekur undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. apríl 2005 at fara undir at keypa økið matr.nr.779a og matr.nr.779b.

Gongdin í málinum hevur verið drúgv, m.a., tí at neyðugt var at fáa góðkenning frá friðingarmyndugleikunum til bygging á økinum, áðrenn lendið varð keypt. Haraftrat er tíð farin til frámatrikulering og samanlegging av ognum býráðsins til byggilendið.

Biðið verður um, at fíggjarnevndin játtar, at peningurin til keypið verður játtaður av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla, so keypið kann avgreiðast.

**Tilmæli**

Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at kostnaðurin fyri keypið á kr. 288.561,67 verður játtað av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Ove Mortensen leggur verkætlanina fram og greiðir frá dispositiónsuppskoti og kostnaðarmeting. Dispositiónsuppskotið er lagað til, at forskúlin og frítíðarskúlin verða skipaðar sum eitt heildartilboð.

Umsitingin hevur saman við skúlanum tikið støðu til at broyta tilboðið frá einum forskúla og frítíðarskúla til eitt heildartilboð, sum er skipað við forskúla og frítíðarskúla. Hetta tí at mett verður, at gerandisdagurin hjá barninum verður tryggari og betri, tá forskúli og frítíðarskúli eru ein heild. Henda skipan skapar í størri mun møguleika at laga dagin eftir tørvinum hjá barninum, tí skilnaður millum skúla og frítíðarskúla verður ikki so eyðsýndur. Støðið eigur altíð at verða tikið í barninum og tí, sum tænir barninum best, her verður hugsað um menning, trivnað og læring.
Samanumtikið er endamálið við heildartilboðnum at geva barninum góðar menningarmøguleikar í tøttum samstarvi millum forskúla og frítíðarskúla.

Til projektering av smábarnaskúlanum, byggileiðslu og eftirlit verður biðið um, at 1.500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan til fólkaskúlan fyri 2010, undirkonto 4175 Dagføring av skúlum.

8. november 2006 samtykti fíggjarnevndin at bjóða arbeiðið út í høvuðarbeiðstøku. Støða er ikki tikin til, um arbeiðið skal bjóðast út í almennari ella innbodnari licitatión.

Tekniski stjóri mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla, at 1.500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan til fólkaskúlan fyri 2010 til projektering, byggileiðslu og eftirlit.

Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóra at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í høvuðsarbeiðstøku í innbodnari licitatión. Inn komu 4 tilboð, og var licitatiónin hósdagin 3. juni 2010.

Úrslitið varð:

| | |
|---|---|
| ▪ Sp/f Valbjørn Dalsgarð | kr. 8.466.742,19 |
| ▪ Sp/f ÁTS v/ Karstin Vang | kr. 8.790.461,00 |
| ▪ Sp/f Búsetur | kr. 9.270.281,46 |
| ▪ P/F Articon | kr. 9.273.824,00 |

Einki tilboð kom frá P/f J&K Petersen.

Ráðgevin Sp/f MAP arkitektar hava kannað tilboðini og mæla til at taka av lægsta tilboðnum.

Tilboðið er kr. 594,569,00 v/6,25% mvg lægri enn kostnaðarmetingin. Mettur samlaður kostnaður, tá hædd er tikin fyri øllum útreiðslum í sambandi við liðugtgerð av smábarnaskúlanum, verður sostatt kr. 12.303.375,00 v/6,25% mvg.

**Bygginevndin 21. juni 2010:** Bygginevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um at taka av lægsta tilboðnum, sum er Sp/f Valbjørn Dalsgarð.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið er mett til at taka umleið eitt ár. Ætlanin er at byrja arbeiðið í viku 26 í ár, og skal bygningurin standa innilokaður við ársskiftið. Roknað verður við – soleiðis, sum tíðarætlanin er sett saman – at arbeiðstakarin brúkar uml. 70 % av tilboðskostnaðinum í inniverandi fíggjarári, tvs. umleið 6 mió kr. Aftat hesum koma so aðrar útreiðslur, so sum trygging, umsiting hjá kommununi, samsýning til ráðgevar, byggistreymur o.s.fr.

Sambært langtíðarløguætlanini var henda bygging ætlað at fara fram í 2011 og 2012. Býráðið hevur áður játtað kr. 1,5 mió til verkætlanina av kontu 4175 Dagføring av skúlum fyri 2010. Á nevndu kontu eru uml. kr. 3,4 mió tøkar, fíggingartørvurin í 2011 verður sostatt kr. 8,9 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini, og at játtaðar verða av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum kr. 3,4 mió í 2010 og kr. 8,9 mió í 2011.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 21. juni 2010.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**111/10** **<u>2009-1977</u>**

**<u>Nýtt atløgupláss til nólsoyarleiðina.</u>**

Tað ljóðar, at Ternan skal røkja **n**ólsoyarleiðina ístaðin fyri Rituna, og at eitt nýtt skip skal byggjast til endamálið innan alt ov langa tíð.

Eftir áheitan frá landstýrismanninum í vinnumálum, sum eisini varðar av Strandfaraskipum Landsins (SL), hevur fundur verið við SL, um at gera eitt hóskandi atløgupláss til tann broytta tørvin.

Á ástaðarfundi í Nólsoy við umboð og skiparar hjá SL varð mett, at nýggja atløguplássið má byggjast úti á Klyvum.

Umsitingin hevur gjørt ein leystliga meting av teimum møguleikunum sum eru, við tilhoyrandi kostnaðarætlan.

Havnin í Nólsoy er kommunal, og tí er tað uttan iva besta loysnin, at Tórshavnar havn stendur fyri einari møguligari útbygging.

Áðrenn endalig støða verður tikin til útbyggingina, má greiða fáast á fíggingini.

**Tilmæli:** Mælt verður til at arbeiða víðari við atløgumøgulekanum at liggja undir flakavirkinum, soleiðis at skipið liggur suður/norð og rampin er inn móti garðinum í sunnara enda.
Eisini verður mælt til at kunna SL um uppskotið, og at taka upp samráðingar við avvarðandi myndugleikar um gjald fyri nýtslu.

**Havnarnevndin 26. oktober 2009:** Samtykt at arbeiða víðari við atløgumøguleikanum at liggja undir flakavirkinum, soleiðis at skipið liggur suður/norð og rampin er inn móti garðinum í sunnara enda.

**Ískoyti:**
Byggiprogram er gjørt, sum leggur upp til bygging av atløgubryggju við fastari rampu úti á Klyvum.

Eisini leggur byggiprogrammið upp til, at skipið liggur eyst/vest, ístaðin fyri suður/norð, sum samtykt á havnarnevndarfundinum 26/10-2009. Hendan broytingin er gjørd, tí mett verður, at tað er lættari at koma til og frá bryggjuni, um gronin verður løgd upp ímóti vesturættini.

Við hesari loysnini verður bryggjan undir gamla flakavirkinum tøk til aðra skipaferðslu.

Úrdrag úr byggiprogramminum:
- 12 m breiður fastur rampi har opið er undir
- 20 m langur bryggjukantur
- Uppbygdar fendarar.
- Skipsfestir
- El- og vatnveiting.
- Kostnaðarmeting 8,5 mió.
- Byggitíð 5 mdr.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at taka undir við byggiprogramminum.
- at játta kr. 300.000 til projektering.

**Nólsoyarnevndin 8. februar 2010:** Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Kristian J. Hansen mæla havnarnevndini at taka undir við tilmælinum.

Vígdis Bjarnadóttir mælir til at leggja skipið inni í molakrókinum.

Nevndin mælir til, at terminalur verður gjørdur samstundis, sum fergulegan verður gjørd.

Samstundis verður mælt til at betra um atkomuna úti á Klivum.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at senda málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og í býráðið um fíggjarnevndina.

Havnarmeistarin Jónsvein Lamhauge var við á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin tekur undir við byggiprogramminum.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin tekur undir við byggiprogramminum.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at hava fund við landsstýrismannin til tess at fáa greiðu á ymsum viðurskiftum viðvíkjandi ferjuni - hvørt talan er um

eina fyribils ella varandi loysn – spurninginum um ein møguligan terminal í Nólsoy til ferðafólkini, spurninginum um havnapengar v.m.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Havnarmeistarin var við á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggiprogramminum.

**Ískoyti til byggiprogrammið:**
Nýggja atløguplássið til Nólsoyarleiðina verður úti á Klyvum. Umframt at smábátar liggja við teym heima í bygdini, liggja eisini nakrir bátar úti á Klyvum, sum eru lutfalsliga stórir. Tá Ternan byrjar siglingina, og tá nýggja atløguplássið blívur tikið í brúk, kann ongin bátur liggja úti á Klyvum.
Um bátarnir, sum liggja úti á Klyvum, verða lagdir við molan heima í bygdini, verður tað sera avmarkað pláss til møguligar vitjandi bátar um summarið.

Um veturin kann tað á ávísum ættum vera trupult at liggja við molan, og tá tað nú ikki verður møguligt at flyta bátarnar út á Klyvar, og bátarnir eru ov stórir at hiva upp á staðnum, er neyðugt at gera umstøðurnar so góðar, at tað framhaldandi verður møguligt at liggja á sjónum alt árið.

Bøtast kann um hendan trupulleikan, við at leggja eina 30m langa flótibrógv vinkulrætt upp á molan, umleið 45 m inn frá molaendanum. Hetta gevur pláss til umleið 25 bátar tilsamans.

Hendan loysnin ger, at at kalla allir bátarnir í Nólsoy fáa pláss við flótibrúnna, til gagns fyri fleiri av bátaeigarunum, sum hava trupulleikar at liggja við teym, tí tað er so grunt.

Av tí at tann nýggja ferjulegan er atvoldin til, at umstøðurnar blíva verri hjá smábátunum, er tað nærliggjandi at víðka um byggiprogrammið, og keypa eina 30 m langa flótibrúgv við tilhoyrandi bummum.

Arbeiðið at keypa og útleggja bátabrúnna, nýtist ikki at vera partur av arbeiðinum at byggja ferjuleguna, men Tórshavnar havn kann sjálv standa fyri tí arbeiðinum, sum er mett at kosta kr. 550.000,-.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at víðka byggiprogrammið við at leggja eina 30 m langa bátabrúgv, við tilhoyrandi bummum, vinkulrætt á molan umleið 45 m inn frá molaendanum.

**Havnarnevndin 10 mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 18. mai 2010:** Nevndin viðmælir ætlanini.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Havnarmeistarin greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**112/10** **2010-1106**

**Viðvíkjandi Karlamagnussarbreyt. Viðgerð av umhvørvisflokking og tilmælir til broyting av skeytunum.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til viðgerð av málinum, sum hevur verið til kunningar og umrøðu á fíggjarnevndarfundi 4. mars 2010 og til umrøðu á fundi í gróthúsinum 13. mars 2010.

**Tilmæli:**
Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at gera fylgjandi broytingar í skeytunum.

- **Treytir til víðari sølu:**

**Verandi Grein 3. stykki c, er soljóðandi.**
Eigarin av hesum stykki bindur seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at klárt er at byggja. Eigarin kann ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá seljara fyrrenn byggingin er fullfíggjað. Bygging verður roknað sum fullfíggjað tá alt byggifeltið er ábygt.

**Grein 3. stykki c, verður broytt til**
Eigarin av hesum stykki bindur seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst. Eigarin kann ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá seljara fyrrenn enn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið frá Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn.

**Viðmerkingar til broytingar.**
Ein trupulleiki fyri keyparan er, at kommunan krevur fult byggifelt ábygd, áðrenn keyparin kann selja stykkið víðari.

Parkeringsplássini kring byggifeltini eru felags, og ber tískil ikki til at brúka parkeringsplássini til egna nýtslu. Her verður t.d. hugsað um av og áskipan av vørum úr bingju o.s.v.

Endamálið við broytingini er at gera tað møguligt hjá umsøkjarum at brúka ein part av egnum byggifelti til virksemið sum t.d. av og áskipan av vørum á økinum.

Samstundis verður við ásetingini tryggjað, at bygt verður út frá Karlamagnussarbreyt og 6 metrar inn.

- **Sundurbýti.**

**Verandi grein 3. stk. h, er soljóðandi.**
Stykkið kann ikki sundurbýtast ella sundurmatrikulerast.

Trupulleikin við hesum er at peningastovnar sum fíggja verkætlaninar, fíggja út frá vinnuendamáli. Talan er um dýrari vinnu rentu, og verður rentustuðul ikki veittur til vinnuligt endamál.
Við verandi áseting ber tó til hjá møguligum keypara av grundøkinum at byggja vinnubygning við íbúðum til útleigan.

Byggideildin metir, at tað er greiðari og betri um ikki ov nógvir eigarar eru av hvørjum matrikli, og mælir byggideildin til einans at loyva sundurboyti av ovastu hædd í bygninginum

Ein grundgeving fyri hesum er at tað yvir eitt áramál, er sannlíkt at tørvurin á økinum broytist. T.d. kann hugsast at nýggjur eigari skal inn á økið, sum hevur brúk fyri stórum bygningi.
Um bygningurin tá er sundurbýttur í nógvar lutir við nógvum eigarum, verður trupult at fáa býarpartin dynamiskan.

Leiðarin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at loyva fult sundurbýti av stykkjunum, vísandi til til løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 25 mai 2009

**Grein 3. stk.h, verður soljóðandi.**
Stykkið kann sundurbýtast, vísandi til løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 25 mai 2009.

**Viðmerkingar til broytingar.**
Endamálið er at geva eigarunum møguleika til at býta allan bygningin í lutir. Tá ber til selja partar av bygninginum út til bæði privat og vinnuligt endamál.
Broytingin gevur eisini peningastovnunum møguleika til at veita sethúsafígging til hesar íbúðir.
Broytingin er eisini í trá við ætlanina um blandaða bústaðar bygging og vinnu.

( Sambært § 1. stk. 2. í lógini framgongur, at undir reglurnar um eigaraíbúðir koma eisini handlar, skrivstovur, goymslurúm, búrúm og onnur serliga avskilað húsarúm)

- **Umhvørvisflokking.**

Økið við Karlamagnussarbreyt er ætlað virkjum sum eru flokkaði í umhvørvisflokk 1 og 2.

Orðingarnar í umhvørvisflokking 2, kunnu tykjast rættuliga tálmandi, sæð í mun til ætlanina um at Karlamagnussarbreyt skal vera ein livandi miðbýur fyri Hoyvík, við tí virksemi sum hoyrir einum miðbýi til.

**Flokkur 2.**
Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstøð og t.d. starvstovur. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 metur.

Verandi umhvørvisflokking verður gjørd sambært meting, og leggur flokkingin upp til 9rættuliga friðarligt virksemið. Sí eisini orðið bókbindari ?

Leiðarin av løgdeildini og kommunustjórin mæla til at brúka verandi umhvørvisflokking.

Mett verður at orðingarnar viðvíkjandi umhvørvisflokkingini eru í lagi.

Heldur enn at broyta orðingar í umvørvisflokkingini, skal kommunan í teimum førum, har tað verður mett neyðugt áseta nærri reglur í skeytunum hjá teimum keyparum, hvørs virksemi sambært meting liggur uttan fyri umhvørvisflokk 2.

Harumframt kemur kommunan hjá hesum umsøkjarum at áseta treytir við byggiloyvunum samsvarandi hesum, soleiðis at tað virksemið sum verður á grundøkinum, verður í samsvar við serstøku byggisamtyktina sum er galdini fyri økið.

Sí eisini grein 3, stk. F, í skeytinum, sum ásetur:

Eigarin ella brúkarin av ognini hevur skyldu til at reka virksemið á ognini soleiðis, at tað ikki við royki, gangi, deymi ella útsjónd síni ella á annan hátt verður virksemið hjá grannum til ampa ella misprýðir økið sum heild.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Leiðarin á løgdeildini og Bjartur Mortensen greiddu frá málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum um broytingar í skeytinum viðvíkjandi grein 3, stykki c.

Samtykt at leggja uppskotnu broytingarnar viðvíkjandi grein 3, stk. h um sundurbýti av stykkjunum fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**-Ískoyti:**
Ætlanin við Karlamagnusarbreyt er, at hetta skal verða ein framtíðar miðstaðargøta í Hoyvíkshaganum. Tí er tað sera týdningarmikið at bygningarnir fram við gøtuni kunnu laga seg eftir skiftandi krøvum ígjøgnum tíðirnar og ikki verða ov fastlæstir.

Fyri at tað skal kunna virka sum ein livandi "miðbýur" fyri Hoyvíkshagan, er tað neyðugt at virksemið sum umsiting/skrivstovuvirksemi, handil, tænastuvinna, mentunarlig-/frítíðartilboð og bústaðir verða fram við gøtuni og at møguleikar eru fyri at virksemi kann broytast við tíðini.

Ásannandi at ein slík miðstaðargøta skal kunna broytast ígjøgnum skiftandi tíðir, hevur serstaka byggisamtyktin fyri Karlamagnusarbreyt ikki serliga neyvar ásetingar um hvat bygningarnir skulu innihalda. Bert at ovasta hædd í bygningum, sum eru 3. hæddir ella meira, skal verða bústaðir og at endin ímóti gøtuni og 6 m inn, skal verð útvent virksemi sum handil, matstova ella tílíkt. Hetta var gjørt fyri gøtan skuldi verða meira smidlig. Eina tíð kann tað verða mest brúk fyri bústøðum og aðrar tíðir møguliga størri hølum til skrivstovuvirksemi o.s.v.

Um loyvi verður givið til at sundurbýta allan bygningin í smærri eindir, kann vandi verða fyri at ein stórur partur av bygningunum verða bústaðir við nógvum eigarum. Tá ið tíðirnar eru broyttar og brúk er t.d. fyri størri hølum til skrivstovuvirksemi, skulu virki, sum hava hug at etablera seg her út til kanska 10 ymiskar eigarar, fyri at keypa eina ella tvær hæddir av einum bygningi.

Tá er vandi fyri at bygningarnir eru ov fastlæstir og tí truplari kunnu laga seg eftir skiftandi tíðum. Tí metir byggideildin at tað ikki skal verða loyvi til at sundurbýta allan bygningin í smáar eindir.

Heiti á hæddunum verður:

| | |
|---|---|
| Kjallari | undir veghædd, minst annar endin er undir jørð. |
| Veghædd | inn frá Karlamagnussarbreyt, ætlað partvíst til útvent virksemi. |
| 1. hædd | omaná veghædd |
| 2. hædd | - |
| 3. hædd | - |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- Veghædd og møguligur kjallari kunnu ikki býtast sundur (skal verða ein samlað eind).
- 1. hædd kann býtast sundur um eingin hædd kann byggjast omaná sambært serstøku byggisamtyktini.
- 2. - 3. hædd kunnu býtast sundur.

Eitt umboð fyri løgdeildina kemur inn at greiða frá málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, tó við tí broyting, at 1., 2. og 3. hædd kunnu býtast sundur.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**113/10** **2009-1377**

**Fíggjarætlan 2010 – flyting millum høvuðskonto**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í fíggjarætlanini fyri 2010 eru borgarstjóralønirnar bókaðar á konto 1311 Býráðsskrivstovan. Fíggjarmálaráðið hevur nú víst á, at borgarstjóralønirnar eiga at bókast á konto 1110 Býráðið. Tí er neyðugt at flyta millum høvuðskonto.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndin til at flyta kr. 751.000 av konto 1310 Býráðsskrivstovan til konto 1110 Býráðið.

(ferðing eigur eisini at flytast yvir, men vit taka hetta í sambandi við FÆ 2011.)

Fíggjarnevndin 14. apríl 2010: Málið útsett.

**Ískoyti:**
Sambært kunngerð nr 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk komununa o.t. § 3, stk. 2 er kontuskipan kommunanna 4 talstavir og ásetir landsstýrsimaðurin virði, heiti og konteringsarleiðbeining.

Sambært konteringsleiðbeiningini er konta 11.11.110 samsýningar til allar kommunustýrislimir, íroknað borgarstjóran. Koyripengar hjá politikarum og ferðing hjá politiskum nevndum fara á hesa konto, meðan umboðan fer á høvuðskonto 11.14.110 Kommunufyrisitingin (Raktstrarj.)

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum og flyta kr. 751.000,- av konto 1310 Býráðsskrivstovan til konto 1110 Býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**114/10** **2009-3122 KF**

**<u>Umsókn frá Sjósavn Føroya og Tórshavnar Froskmannafelag um broyting av byggisamtyktini soleiðis at, sjósavnið kann byggjast út vestureftir.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umboð fyri Sjósavn Føroya og Tórshavnar Froskmannafelag høvdu í desember 2009 ein fund við borgarstjóran, kommunustjóran og leiðaran á byggideildini, har teir løgdu fram ætlanir um útbygging av savninum. Ætlanin er at leingja bygningin 35 m vestureftir í eini breidd av 11 m, ella tilsamans 385 $m^2$. Av hesum skal Froskmannafelagið hava 110 $m^2$ og sjósavnið 275 $m^2$.

Økið har sjósavnið liggur, er sambært almennu byggisamtyktini í D1-øki og liggur so nær sjóvarmálanum, at tað er umfatað av sjófriðingarlinjuni sambært §2, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 48 um náttúrufriðing. (*Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini ... upp til 100 m frá bakkatromini...*).

Um útbyggingarætlanin skal fremjast, er neyðugt at broyta byggisamtyktina og at fáa loyvi frá friðingamyndugleikunum.

Í januar kom so ein umsókn frá feløgunum um at byggisamtyktin verður broytt fyri økið.

Ætlaða útbyggingin av Sjósavninum kann stórt sæð liggja á verandi parkeringsøkinum, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Vísandi til at økið liggur tætt við Sandagerð og at ætlanin er at gera ein lutfallsliga stóran bygning, metir umsitingin ikki at tað er rætt at broyta byggisamtyktina og lata Sjósavn Føroya og Tórshavnar Froskmannafelag økið til at byggja á.

Um býráðið er sinnað at stuðla Sjósavn Føroya at byggja út, eigur kommunan at fara inn í eitt nærri samstarv við felagið um hvussu byggjast skal og um savnið skal liggja á verandi stað ella eigur at verða flutt til annað stað.

Um byggisamtyktin bert verður broytt og økið latið feløgunum uttan stórvegis avtalur og trygd fyri hvussu bygt kann tað verða ringt at seta krøv seinni.

Vísast kann eisini á, at kommunan eftir umsókn frá Havnar Bjargingarfelag broytti byggisamtyktina fyri eitt øki sunnan fyri bátahylin á Argjum til at byggja eitt felagshús á.

Í sambandi við ætlaða nýggja smábátahavn við Álakerð er eisini ætlanin at leggja økið til neyst/felagshús til frítíðar- og ítróttarfeløg v.m. sum hava nakað við sjógvin at gera.
Eitt av hesum økjunum kundi verið passandi til felagshølir til Tórshavnar Froskmannafelag.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta byggisamtyktina fyri økið við Føroya Sjósavn men taka upp nærri samstarv við felagið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**115/10** **<u>2009-1368/14 SG</u>**

**<u>Keyp av matr. nr. 373a & 373c í Tórshavn, t.e. ognirnar við Niels Finsensgøtu 7, har býarbókasavnið o.o. halda til.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Samband hevur verið við umboð fyri sp/f Heim, Eyðfinn Reyðberg, stjóra fyri Norðoya Sparikassa um møguleikar at keypa ognirnar, matr. nr. 373a & 373c í Tórshavn, t.e. ognirnar við Niels Finsensgøtu 7, har býarbókasavnið o.o. halda til.

Býráðið hevur eftir tilmæli frá fíggjarnevndini 29. desember 2008 samtykt at góðtaka uppskotið til 10 ára leigusáttmála, har árliga leigan fyrsta ári er kr. 1.189.708,-.

Útleigarin krevur harumframt hækking uppá 2,5% árliga í mun til leiguna undanfarna ár, tó fyrstu ferð 1. januar 2010.

Nevndin tekur ikki undir við árligari hækking av leiguni uppá 2,5 %, men kann góðtaka at leigan verður prístalsviðgjørd hvønn 1. januar í mun til prístalsgongdina í árinum frammanundan.

Marnar Mortensen, varastjóri í Norðoya Sparikassa hevur góðtikið samtyktina hjá fíggjarnevndini um hækking av leiguni í mun til prístal, í staðin fyri fasta árliga hækking av leiguni uppá 2,5 %, tó krevur Norðoya Sparikassi at leigan ongantíð kann lækka.

Kommunan kann keypa ognirnar fyri 17 mió. kr., Norðoya Sparikassa bjóðar sær til at fíggja part av keypinum t.e. upp til 15 mió. kr., soleiðis at lánsgjaldið fyrstu fimm árini verður ein millón kr., hetta er sama upphædd sum leigan. Aftaná fimm ár skal nýggj avtala gerast um rentur og avdrátt. Rentan fyrstu fimm árini verður sum fyri húsalán, rentan er í løtuni 6%.

Ætlanin er at Býarbókasavnið skal hava alt sítt virksemi í ognunum, tó verða hølini, sum Joto var í leigaði út til handil.

Í sambandi við yvirtøku av ognunum verður neyðugt at umbyggja part av veghæddini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til keypa ognirnar fyri 17 mió. kr., at taka við fíggingartilboðnum frá Norðoya Sparikassa, og at fíggja restina 2 mió. kr. av konto 90.

Eisini verður mælt til at játta upp til 1.5 mió. kr. til umbygging av konto 90.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa bygningin og heimila umsitingini til at fáa fígging til vega til keyp og umvæling. Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið aftur.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað møguleikar fyri fígging og lýsir málið á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av lánitilboði frá Føroya Banka í sambandi við keypið.

**Býráðið 25. juni 2009**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Virksemið hjá býarbókasavninum skal framyvir eisini verða í veghæddini. Í hesum sambandi skulu ávísar dagføringar og umvælingar gerast í hølunum umframt í kjallaranum og á fasaduna móti gongugøtuni. Tilboð uppá arbeiðið koma inn fyrst í næstu viku. Fyribils eru í alt kr. 3,6 mió settar av, harav kr. 700.000 eftir avtalu verða fluttar frá avlopinum hjá Býarbókasavninum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Beint aftur í mentamálanevndina við atliti til at lýsa málið og finna endaliga fígging til arbeiðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Tikið av skrá.

**116/10** **<u>2009-1604/25 SG</u>**

**Umsókn frá Sp/f B & B, Viðargøta 13, 160 Argir**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Felagið eigur ognirnar Fútastovu og Hotel Djurhuus/Vertshúsið. Fútastovan er gamalt sethús ið er blivið ístandgjørt.

Søkt verður um loyvi til girðing framman fyri Fútastovu, og um at seta eitt lítið rekkverk upp við síðina av hurðini inn til ætlaðu matstovuna á Hotel Djurhuus/Vertshúsið.

Felagið hevur ymiskar ætlanir við báðum teim omanfyri nevndu ognunum, sum eisini umfata eitt øki út frá Fútastovu, sum liggur nakað út um matrikkulin, har í ognin Fútastova stendur.

Ætlanin er at innrætta veghæddina í Hotel Djurhuus/Vertshúsið til matstovu og Áarstovugrundina til útiservering. Servering kemur tí at verða bæði innan- og uttandura. Serveringin verður samskipað við Café Natúr.

Økið uttan fyri Fútastovu, verður inngirt við pullartum, sí hjáløgdu tekning, men verður hóast hetta møguligt hjá fólki til gongu at ganga á økinum.

Ein lítil pallur verður uppsettur inni á økinum, og kemur pallurin í størstan mun at liggja inni á matriklinum Fútastovu.

Ætlanin er at skipa fyri ymiskum mentunarligum tiltøkum á økinum, millum annað verður skipað fyri tónleiki, røðum og líknandi.

Ætlanin er sum skilst at hava eitt ávíst samarbeiði við Café Natúr, sum liggur hinumegin vegin.

Umsøkjarin metir, at teirra ætlan, hevur positiv árin á økið, og vilja tiltøkini skapa virksemi og hugna á økinum, samstundis sum økið verður eitt prýði fyri Tórshavnar kommunu.

Umsøkjarin metir ikki, at henda inngirðingin kemur at tarna ferðsluni, og at inngirðingin eisini verður til fyrimuns fyri fólk tíl gongu, sum er vard móti bilferðsluni, tá ið tey ganga innan avmerkta økið.

Lógir, ásetingar o.a.:
Økið liggur í 2. grundumráði í Serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

Upplýsingar frá umsitingini:
Grundøkið, matr. nr. 27 = Fútastova,
Grundøkið, matr. nr. 28 = Hotel Djurhuus/Vertshúsið,
Grundøkið, matr. nr. 29 = Áarstovugrundin, Tórshavn.

Umhvørvisárin:
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

Fíggjarligt:
Ongar bindingar fyri kommununa.

Skjøl:
Umsókn og tekningar, journalnr. 2009-1604
Støðumynd.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Nevndin er sinnað at leiga økið út og beinir málið í ferðslunevndina, teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at beina málið til fornminnismyndugleikarnar til ummælis.

Petur Háberg Jacobsen og Sverri Heinisen vóru við á fundinum og greiddi frá teirra ætlanum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til, at umsøkjarin kann fáa loyvi til at girða økið inni, treytað av at vegaøkið fram við Fútatorg og frá Havnagøtu verður gjørt til sonu 30 km/t. Og at tað ikki ber til at koyra skjótari enn loyvdu hámarksferð.

Mælt verður til, at ein girðing verður sett upp runt um økið, sum tryggjar at bilar við hámarksferðini ikki kunnu koma at teimum bleytu ferðandi, sum eru á tí inngirda økinum.
Um Økið ikki verður gjørt til eina hámarksferð uppá 30 km/t, má tann fysiska sperran uttan um Fútatorg gerast til 50 km/t.

Mælt verður til at parkeringsbásarnir við Kongabrúnna verða tiknir burtur, soleiðis at bilar ikki bakka inn á Fútatorg. Um parkeringsbásarnir ikki verða tiknir burtur, er neyðugt at minka um Fútatorg, so pláss verður fyri at bilarnir frá parkeringsplássinum kunnu bakka út. Hetta merkir, at 7 m skulu verða millum parkeringsbásarnar og Fútatorg, sí tekning.

**Ferðslunevndin 30. november 2009:** Ferðslunevndin tekur undir við at loyva umsøkjaranum sítt virksemi innanfyri tað økið, ið er ávíst í tekning journal. nr 2009-1604/14.
Harumframt verður tikið undir við tilmælinum hjá ferðslubólkinum, um at seta girðing upp, runt um økið, sum tryggjar at skilnaður er í millum ferðslu og vitjandi. Girðingin skal gerast soleiðis, at ikki gerst møguligt hjá vitjandi at fara út á koyribreytina.

Nevndin mælir til at hámarksferðin verður 30 km/t.

Mælt verður frá at taka parkeringsbásarnar burtur.

Málið verður beint í teknisku nevnd til støðutakan

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka undir við tilmælinum frá ferðslunevndini og tilmælinum frá ferðslubólkinum at neyðugt er at minka um Fútatorg, so pláss verður fyri at bilarnir frá parkeringsplássinum kunnu bakka út. Hetta merkir, at 7 m skulu verða millum parkeringsbásarnar og Fútatorg.
Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við treytunum hjá teknisku nevnd hin 11. febr. 2010, og annars at ganga umsóknini á møti, soleiðis at byggiloyvi, sambært tekning "Ískoyti til umsókn", dagfest 23.02.10, kann útskrivast, tá leigusáttmáli er undirskrivaður.

Tekniski stjórin var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at taka undir við uppskoti til leigusáttmála og annars taka undir við tilmælinum frá ferðslunevndini og tilmælinum frá ferðslubólkinum at neyðugt er at minka um Fútatorg, so pláss verður fyri, at bilarnir frá parkeringsplássinum kunnu bakka út. Hetta merkir, at 7 metrar skulu verða millum parkeringsbásarnar og Fútatorg.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at taka undir við uppskoti til

**Ískoyti:**
Verandi sáttmáli er galdandi í trý ár, og leigarin ynskir – við atliti til tær íløgur, leigarin hevur lagt í økið – at leingja leigumálið. Skotið verður upp at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika fyri framleingjan í 10 ár afturat.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Løgdeildini mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála. Samtundis fer úr gildi higartil galdandi sáttmáli um økið.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til 10 ára leigusáttmála.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**117/10** **<u>2010-1413</u>**

**<u>Umsókn um langtíðar leigu av øki á havnarlagnum í Kollafirði, til bygging av frystigoymslu.</u>**

Sp/f Faroe Pelagic og P/F Samskip søkja hvør í sínum lagi um loyvi at leiga lendið millum frystigoymsluna hjá Samskip og uppisjóvarvirkið hjá Eik. Økið, sum talan er um, er umleið 4.600 $m^2$ til víddar.

Samskip: Samskip eigur verðandi frystigoymslu, sum tekur 3.000 tons. Í løtuni taka teir ímóti øllum fiskinum, sum verður virkaður á uppisjóvarvirkinum.
Í 2006, hevði felagið ætlanir um at byggja uppí goymsluna, og fingu teir tá tilsøgn um at leiga økið, men ætlanin datt niðurfyri, tí forteytirnar broyttust. Endaligur leigusáttmáli bleiv ikki gjørdur.

Faroe Pelagic: Faroe Pelagic leigar í løtuni bygningin frá Eik. Felagið hevur, fram til 1. november 2010, optión uppá at keypa bygningin. Í løtuni kannar felagið, um tað er ein burðardygg íløga at keypa uppisjóvarvirkið. Ein liður í kanningini er, um møguleiki er at byggja eina frystigoymslu.

Ein av forteytunum fyri at tað blívur bygt er, at Faroe Pelagic keypir uppisjóvarvirkið frá Eik, og at framleiðsluorkan verður økt frá verðandi 400 tonsum til 1.000 tons um dagin.

Bygging av frystigoymslu er fult í tráð við byggisamtyktina, og ætlanin hevur alla tíðina verið, at økið skal brúkast til at vaksa um virksemið hjá antin frystigoymsluni ella uppisjóvarvirkinum.

Um so er, at tað verður ein eigari av verðandi frystigoymslu og ein annar eigari av tí nýggju frystigoymsluni, kann tað blíva so trongligt við bryggjuna, at tað kann blíva trupult at avgreiða skipini. Hesin trupulleikin verður loystur, um tað er sami eigari av báðum frystigoymslunum, ella ein ella annar formur fyri samstarvi.

Samskip og Faroe Pelagic samráðast í løtuni um, hvussu teir kunnu skipa seg.

Leigusáttmálin fyri grundøkið undir teimum verðandi bygningum er einsljóðandi, og er tað tí nærliggjandi antin at leiga grundøki, sum eitt ískoyti til verðandi

leigusáttmálar, ella at gera ein nýggjan einsljóðandi leigusáttmála.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at ganga umsóknunum á møti, at leiga út til bygging av frystigoymslu. Við støði í samráðingum millum Samskip og Faroe Pelagic, verður leigað út til tann, sum byggir.

At leigað verður út til somu treytir, sum fyri verðandi frystigoymslu og uppi-sjóvarvirki.

Endalig leiguavtala skal vera undirskrivað innan árslok 2010, annars fellur tilsøgnin burtur.

**Havnarnevndin 14. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Havnarmeistarin greiddi frá málinum. Samtykt at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Elin Lindenskov

**118/10** __2009-0276__

__**Umval av 1 limi í nevndina hjá dagstovninum á Argjum**__

Sambært reglugerðini fyri stovnin velur kommunan 3 limir fyri sítt valskeið.

**Býráðið 29. januar 2009:** Jens M. Poulsen, Ingibjørg Berg og Jóhan E. Simonsen.

**Ískoyti:**
Áheitan frá Jens M. Poulsen og Ingibjørg Berg um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 5. november 2009:** Valdar vórðu Katrin Petersen og Tina Johannesen.

**Ískoyti:**
Áheitan frá Jóhan E. Simonsen um at velja annað umboð fyri seg í nevndina.

**Býráðið 24. juni 2010:** Valdur varð Jóan Petur Hentze.

- Nú kom Elin Lindenskov

# Mál uttan fyri skrá

**119/10** **<u>2010-1321</u>**

**<u>Áheitan um at tilboðið hjá Heimavitjunartænastan verður víðkað við einum ergoterapeuti at starvast ¾ tíð</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fysioterapeuturin í Heimavitjunartænastuni hevur verið við í eini verkætlan hjá Nærverkinum og Tórshavnar kommunu, har terapeutarnir í kommununi hava arbeitt saman í einum toymi.

Brúkarnir hava verið búfólk á Lágargarði, Tjarnargarði, Ellis- og umlættingarheiminum, sambýlunum og heimabúgvandi við mistum ella niðursettum førleika. Endamálið við tilboðnum er at fremja og varðveita heilsu og fyribyrgja sjúku hjá brúkarum við skerdum førleika.

Verkætlanin endar 1. juni 2010 og vantandi verður niðurstøðan og tilmælið, at allir terapeutarnir verða settir í eini sjálvstøðugari eind undir Nærverkinum, sum tó hevur gjørt greitt, at Nærverkið ikki fer at fíggja fysioterapeutin hjá Heimavitjunartænastuni.

Av tí at Heimavitjunartænastan framhaldandi fer at leggja dent á tað fyribyrgjandi og heilsufremjandi arbeiði, sum ikki er vent ímóti sama brúkaraskara, sum tað hjá toyminum, mælir leiðarin frá, at fysioterapeuturin hjá Heimavitjunartænastuni verður settur í eindini undir Nærverkinum.

Ergoterapeuturin, sum er settur 15 tímar á Tjarnargarði til heimabúgvandi pensiónistar, hevur saman við fysioterapeutinum í Heimavitjunartænastuni staði fyri teimum fyribyrgjandi venjingunum í Badmintonhøllini. Eisini hevur samstarv verið við ergoterapeutin í sambandi við serliðini, sum hava verið til venjingar á Tjarnargarði. Hetta samstarv hevur hepnast sera væl, og hava venjingarnar verið sera væl umtóktar.

Leiðarin fyri Heimavitjunartænastuna vísir á, at um ein ergoterapeutur varð settur í starv í Heimavitjunartænastuni kundi tilboðið í Badmintonhøllini verið viðkað til tvær ferðir um vikuna eins og venjingartilboðini fyri serlið á Tjarnargarði eisini vóru víðkað til at umfata aðrar sjúklingabólkar.

Útreiðslurnar av einum ergoterapeuti í ¾ tíð verða mettar til kr. 200.000 um árið.

**Tilmæli:**
Sosialdeildarleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til, at tað fyribyrgjandi og heilsufremjandi tilboðið hjá Heimavitjunartænastuni verður víðkað við, at eitt starv sum ergoterapeutur í ¾ tíð verður normerað í Heimavitjunartænastuni og at meirútreiðslan verður tikin við á fíggjarætlanini fyri 2011.

**Sosiala nevnd 1. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Við umbidnu normeringini ber til at vaksa um venjingarnar, ið eru fíggjaðar við brúkaragjaldi, eins og at talið av brúkarum kann vaksa. Við støði í hesum og lítlari hækking í brúkaragjaldinum verður mett, at til ber at fíggja meginpartin av mettu meirútreiðslunum til normeringina, ella umleið kr. 157.000. Tað vil siga, at metta meirútreiðslan verður ikki kr. 200.000, men umleið kr. 43.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at meirútreiðslurnar til øktu normeringina, í mestan mun verða fíggjaðar við øktum inntøkum frá brúkaragjøldum.

**Sosiala nevnd 23.juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at virksemið í framtíðni verður brúkarafíggjað.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

- Levi Mørk fór av fundi meðan mál nr. 120/10 varð viðgjørt

**120/10** **2009-1586/6 SG**

**Frítíðar- og ungdómsvirksemi í Hoyvík**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Barna og Ungdómsdeildin hevur nú í eina tíð kannað viðurskiftini hjá børnum og ungum í Hoyvík. Sum er, eru eingi tilboð til børn og ung úr 3. flokki upp til 18 ár í Hoyvík, sum minna um tey tilboð, Margarinfabrikkin bjóðar børnum og ungum, ið búgva í miðbýnum. Fundur hevur verið við bæði frítíðarskúlan og skúlan, og vísa tey á, at tørvur er fyri slíkum tilboði í nærumhvørvinum.

Frítíðarskúlin í Hoyvík hevur ikki rúm fyri fleiri børnum áðrenn kl. 17.00, men kann bjóða ungum úr 13 ár upp í 18 ár eftir kl. 17.00 til kl. 22.00. Tí hevur umsitingin sett seg í samband við samkomu í grannalagnum, ið hevur eitt høli, sum hóskar væl til frítíðarvirksemi fyri børnum úr 9 upp í 12 ár. Ætlanin er at hava opið frá kl. 13.30 til 17.00 (sí upplegg til sáttmála).

Leiðslan fyri frítíðarskúlan í Hoyvík skal hava leiðsluna um hendi fyri frítíðar- og ungdómsvirkseminum í Hoyvík.

Væntast kann, at áleið 50 til 60 børn fara at taka av frítíðartilboðum. Roknast kann við, at áleið tað sama talið av ungum fara at taka av ungdómtilboðnum í Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

Til tess at nýta hølini, ið verða leigað til endamálið, fult út, hevur Dagstovnurin í Hoyvík spurt, um tey kunnu brúka hølini fyrrapart og teir seinnapartar, tá ið klubvirksemi ikki er, til tey elstu børnini á stovninum.

Talið á børnum, ið fara í skúla skúlaárið 2010/11, er sera stórt í Dagstovninum í Hoyvík í ár. Fáa hesi børnini møguleika fyri at nýta hølini, ið standa beint við síðuna av Dagstovninum í Hoyvík, ber til at taka fleiri børn inn í vøggustovuna í Hoyvík eftir summarfrítíðina

Til tess at lúka øll myndugleikakrøv í leigaðu hølunum, hevur Húsaumsitingin gjørt uppskot til nakrar broytingar og kostnaðarmeting.

**Kostnaðarmeting:**

| | | |
|---|---|---|
| Broyting av hølum sambært myndugleikakrøvum | kr. | 70.000,00 |
| Tilfar og útgerð | | 150.000,00 |
| **Tilsamans** | **kr.** | **220.000,00** |

Henda upphædd verður fíggjað av konto 599-3187 (økt barnatal)

| | | |
|---|---|---|
| Leiga av hølum í 1 ár | kr. | 120.000,00 |
| Hiti og el | | 40.000,00 |
| **Tilsamans í 1 ár** | **kr.** | **160.000,00** |

Henda upphædd er kr. 66.670,00 í 2009 og verður í fyrstu atløgu tikin av konto 599-3187 (økt barnatal).

**Rakstur í 1 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| Blokkur pr. barn (1/3 av blokkinum til frítíðarskúlar) | kr. | 12.023,00 |
| 120 børn og ung | kr. | 1.442.760,00 |
| Húsaleiga | kr. | 160.000,00 |
| **Rakstur tilsamans 1 ár** | **kr.** | **1.602.760,00** |

Á frítíðarskúlaøkinum ber til at spara tímar, nú undirvísingartímarnir í 1. og 2. flokki eru hækkaðir í skúlunum. Ætlanin er tí at seta tímatalið í frítíðarskúlunum fyri barnið niður frá 3 til 2,44 barn frá 1. januar 2010. Hetta gevur eina sparing á uml. 950.000 kr um árið. Yvirskotstímarnir í frítíðarskúlunum, sum talan her er um, kunnu verða endurnýttir at fíggja klubbavirksemið í Hoyvík.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstur í 5 mðr. frá august til des. 2009 | kr. | 601.150,00 |
| Rakstur í 4 mðr. frá september til og við desember 2009 | kr. | 480.920,00 |
| **Opið 2 ferðir um vikuna í 4 mðr.** | **kr.** | **216.414,00** |

**Um kravd verða brúkaragjald:**

| | | |
|---|---|---|
| Í 1. ár 25% foreldur | kr. | 360.690,00 |
| Kommunurnar partur 75% | kr. | 1.082.070,00 |

(Barnagjaldið er kr. 300,00 um mánaðin í 10 mðr.)

Orsakað av, at einki brúkaragjald verður kravt á Margarinufabrikkini, verður mælt til, at einki brúkaragjald verður kravt í ár. Hesin spurningur eigur at verða tikin upp sum heild bæði í umsitingini og politiskt, áðrenn brúkaragjald verður sett í verk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at farið verður undir frítíðar- og ungdómsvirksemi í Hoyvík, og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 216,414,00 til rakstur frá september til og við desember 2009 at hava opið tvær ferðir um vikuna.

Og at játta 650.000 kr. til rakstur og húsaleigu á fíggjarætlanini fyri 2010 (1,6 mió kr, mótroknað yvirskotstímar á frítíðaskúlaøkinum á 950.000 kr.). Samstundis eigur støða at verða tikin til brúkaragjald.

**Mentamálanevndin 16. juni 2009:** Ein meiriluti Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Marin Katrina Frýdal, samtyktu at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Útsett til eyka fíggjarnevndarfund hósdagin 25. juni 2009.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at lýsa vavið av uppgávuni, eisini við atliti til onnur øki í kommununi.

**Býráðið 25. juni 2009:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Sjúrður Olsen, um at taka undir við fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Inga Dahl og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Símun Simonsen og Maria Hammer Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað omanfyri nevnda mál av nýggjum, og komin til ta niðurstøðu, at neyðugt er at seta ungdómsvirksemi á stovn í Hoyvík, har tørvurin er størstur. Fundur hevur verið við leiðsluna í Skúlanum og frítíðarskúlanum í Hoyvík, og hava tey játtað at lata frítíðarskúlan upp fyri ungdóminum eftir afturlatingartíð. Talan er í fyrstu atløgu um tveir dagar um vikuna, mánakvøld frá kl. 18.00 til 23.00 og leygarkvøld frá kl. 22.00 til 02.00 í tríggjar mánaðir sum eina royndarætlan. Aldursbólkurin er ímillum 13 og 18 ár. Virksemið verður fíggjað av konto nr. 3215-147905 eftirútbúgving og royndarvirksemi hjá Barna og Ungdómsdeildini kr. 100.000.

Í hesum tíðarskeiði arbeiðir umsitingin víðari við, hvussu ungdómsvirksemið til henda aldursbólkin í Hoyvík kann skipast fast, herundir kostnaðarmeting og fígging restina av árinum. Harumframt verður arbeitt víðari við tørvinum í øðrum økjum í kommununi.

Umsitingin hevur eisini kannað møguleikan fyri klubvirksemi fyri børnum úr 3. til 6. flokk í Hoyvík. Soleiðis sum støðan sær út beint nú, er trupult at finna egnaði hølir til hetta virksemið í Hoyvík. Í sambandi við at Hoyvíkshøllin verður útbygd, eigur at verða kannað, um møguleiki verður fyri at innrætta loftið til klubba hjá teimum eldru børnunum, hetta liggur tó longi frammi í tíðini. Umsitingin vil arbeiða víðari við hesi ætlan og gera eina kostnaðarmeting og venda aftur við einum ítøkiligum uppskoti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla menta-málanevndini til at samtykkja, at farið verður undir ungdómsvirksemi í frítíðarskúlanum í Hoyvík ætlað teimum 13-18 ára gomlu frá 15. mars 2010 at rokna fyribils sum royndarverkætlan í 3 mánaðir, og at raksturin hesar mánaðirnar verður fíggjaður innanfyri verandi fíggjarkarmar.

**Mentamálanevndin 3. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ungdómsvirksemið í Frítíðarskúlanum í Hoyvík hevur nú virkað í slakar 3 mánaðir. Opið hevur verið tvey kvøld um vikuna, mánakvøld og leygarkvøld. Undirtøkan hevur verið sera stór, áleið 100 ung hava vitjað hvørt kvøld. Bæði ung og foreldur í Hoyvík eru sera fegin um tiltakið og vóna, at tað fer at halda fram.

Virksemið hevur verið fíggjað av kontu nr. 3215-147905 eftirútbúgving og royndarvirksemi hjá Barna- og ungdómsdeildini.

Kostnaðurin fyri at halda fram við verandi virksemi eftir summarfrítíðina frá september til og við desember er mettur til kr. 130.000,00. Til ber at fíggja hetta av kontu nr. 3215-147905 eftirútbúgving og royndarvirksemi hjá Barna- og ungdómsdeildini.

Ætlanin er at seta pening av á fíggjarætlani komandi ár soleiðis, at ungdómsvirksemið í Frítíðarskúlanum í Hoyvík kann halda fram og hava opið tríggjar ferðir um vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til at góðkenna, at kr. 130.000,00 verða fluttar av konto 3115-147902 hjá Barna og ungdómsdeildini til Ungdómsvirksemið í Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 2. juni 2010 og góðkenna, at kr. 130.000,00 verða fluttar av konto 3115- 147902 hjá Barna og ungdómsdeildini til Ungdómsvirksemið í Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 22:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |